Nr. 17 • apríl 2013

# MIÐ & MAGN

Føroya Skipara- og Navigatørfelag & Maskinmeistarafelagið



**ÚTGEVARI**
Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag geva MIÐ & MAGN út í felag.
Blaðið verður sent limunum og teimum, sum tekna hald.
4 útgávur eru um árið.

**BLAÐNEVND**
Eyðstein Djurhuus, *ábyrgdarblaðstjóri*
Regin Nónstein
Eyðstein Djurhuus
Jóan Petur Patursson

**MASKINMEISTARAFELAGIÐ**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Telefon 314718
Teldupostur: mf@mf.fo

**FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG**
Jekaragøta 10
Postboks 248
110 Tórshavn
Telefon: 316973
Teldupostur: fsn@fsn.fo

**BLAÐHALD**
Tey, sum ynskja at halda MIÐ & MAGN, kunnu boða frá hesum í teldupost til:
info@midogmagn.fo
Haldara gjaldið er 200,- kr. um árið, tað er fyri 4 bløð.

**ENDURGEVING**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst.
MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
www.mf.fo
www.fsn.fo

**FORSÍÐUMYND**
Gullberg við bryggju í Havn

**PDF ÚTGÁVA**
Mið og Magn kann ókeypis heintast sum PDF á:
www.fsn.fo
www.mf.fo

**UMSITING**
Sp/f MEDIA
info@midogmagn.fo

**UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Føroyaprent · www.foroyaprent.fo

Upplag: 1.800

# Skil komið á sáttmálarnar í fiskiskipaflotanum



*Eyðstein Djurhuus, ábyrgdarblaðstjóri*

Í apríl 2011 varð ein roynd gjørd at samanskriva sáttmálarnar hjá teimum trimum manningarfeløgunum við skipabólkarnar undir Reiðarafelagnum í eitt samlað skjal. Tað vóru komnar nógvar grundleggjandi broytingar í sáttmálarnar eftir verkbannið í februar 2011. Tíverri varð hetta skjal ongantíð undirskrivað av øllum pørtum tí, at øll nevndin í Reiðarafelagnum legði frá sær og skrivstovan bleiv stongd.

Manningarfeløgini longdu sáttmálan við einstøku skipabólkarnar við árslok 2011, og aftur í 2012 við at vísa til tað samanskrivaðu útgávuna við smærri justeringum. Onkur skipabólkur hevði ongantíð vilja longt nakran sáttmála, og summar røddir hava verið frammi um at ongin sáttmáli var galdandi.

Til samráðingarnar nú í vetur var tað eitt sera stórt ynski frá okkum um, at allir partar skrivaðu undir felagsreglurnar í sáttmálanum. Tað var ein stór pedagogisk avbjóðing at greiða øllum skipabólkum frá smálutunum í tí samanskrivaðu útgávuni og, at vit ynsktu at felagsreglurnar skuldu vera einsljóðandi fyri allar bólkar.

Nú er aftur gjørd ein roynd at samla tropparnar í Reiðarafelagnum, og tí var tað ein góður stemningur fyri hesum átaki frá okkara síðu. Serreglurnar fyri teir einstøku bólkarnar gingu ikki líka lættliga. Neyðugt var, við hjálp frá Semingsstovninum, at semjast við Trolskip (partrolara) um eina nýggja skipan viðvíkjandi høgu oljuútreiðslunum.

Nú er sáttmáli gjørdur við flestu skipabólkar, ídnaðarskip og nótaskip mangla enn.

Fyri nótaskipini varð avtalað, at samráðingarnar skuldu bíða inntil úrskurður er sagdur í einum gerðarrættarmáli millum Fiskimannafelagið og Nótaskip um hvørt uppboðssølugjald er loyvdur frádráttur.

Manningarfeløgin fegnast um, at nú eru umsíðir útlit fyri, at skil kemur á sáttmálaviðurskiftini.

*Vegna Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið*
*Eyðstein Djurhuus, ábyrgdarblaðstjóri*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
541 705



**4**
Maskinmeistarar á aðalfundi



**12**
Framhaldandi vánaligt

# Innihaldsyvirlit


Maskinmeistarafelagið hevði aðalfund 23. mars 2013 . . . . . . . . . . . . 4
Gulak Gulaksen: Bara framhaldandi vánaligt . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .12
Svørt lomb í FAS . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .16
Nýggi stjórin í Sjóvinnustýrinum:
Vit skulu hava eina 0-hugsjón á sjónum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .18
Brennidepilin: Jacob Petur Johannesen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 20
Felagið Línuskip: Hálvdan Gudmundsen:
Vit eiga allir Flemish Cap . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 22
Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 24
Tíðindi frá Skipara- og Navigatørfelagnum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 26
Nú er eisini kríggj um sildina . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 27
Farma- og frálandasáttmálin vorðin eitt slag av minstuløn . . . . . . 28
Føðingardagar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 29
Dánjal Jákup Meinertsson: Felagsskapurin Antares . . . . . . . . . . . . . 30
Lívið umborð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 32
Heimurin liggur nú opin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 34




**32**
Lívið umborð



**16**
Svørt lomb í FAS



**30**
Felagsskapurin Antares

# MASKINMEISTARAFELAGIÐ HEVÐI AÐALFUND 23. MARS 2013

**Ársaðalfundurin varð hildin á Hotel Hafnia, skráin var sambært lóg felagsins:**

1. Val av fundarstjóra
2. Frágreiðing formansins
3. Framløga av roknskapi til góðkenningar
4. Uppskot um lógarbroytingar (onki uppskot var til lógarbroyting)
5. Val av nevndarlimum og tiltakslimum
6. Ásetan av limagjøldum
7. Val av skrásettum grannskoðara
8. Ymiskt

Møgulig uppskot at leggja fyri aðalfundin skulu sambært viðtøkum felagsins vera nevndini í hendi í seinasta lagi 14 dagar undan aðalfundinum, men boðað var ikki frá nøkrum uppskoti til skránna.

Sambært viðtøkunum kunnu limir koma á skrivstovuna at kunna seg um roknskap og møgulig uppskot at leggja fyri aðalfundin teir seinastu 14 dagarnar áðrenn fundin.

Viðvíkjandi vali til nevndina høvdu Regin Olsen og Jón F. Johansen boðað frá, at teir stilladu upp til nevndarval og vórðu valdir. Ólavur Gunnarsson, sum hevur verið nevndarlimur í nógv ár, hevði áðrenn fundin boðað frá, at hann ikki tók við afturvali. Á sjálvum aðalfundinum kundu fleiri valevni stilla upp til nevndarval.

Sambært viðtøkunum verður formaðurin valdur triðja hvørt ár, og sitandi formaður, Páll Hansen, stóð tí ikki fyri vali.

## Botnrekord

**Ongantíð áður hava so fáir maskinmeistarar víst aðalfundinum hjá Maskinmeistarafelagnum áhuga. Minni enn trý prosent av limunum møttu.**

*Eftir Gunnar Skúvadal*

– Hetta man vera botnrekord, letur í formanninum í Maskinmeistarafelagnum meðan hann skeinkir sær uppí ein kopp av kaffi, og kveitir at klokkuni. Vit eru á Parnassinum í Hotel Hafnia, dagurin er leygardagur 23. mars 2013 klokkan 14. Løtan tá aðalfundurin hjá Maskinmeistarafelagnum er settur at vera.

Inni í fundarhølinum eru 14 mans. Tá eru nevnd og leiðsla umframt tygara útsendi tald uppí.

10 minuttir seinni vóru nakrir fáir komnir afturat, og nú var nóg leingi bíðað, metti formaðurin, og gav boð um at byrja fundin.

Hetta er ikki nógv í einum felag, sum telur einar 600 menn og eina konu. Og eg spurdi Páll Hansen, formann, tá fundurin var liðugur, hví talið á luttakarum mundi vera so lágt.

– Ja, tað er ein góður spurningur. Hetta er tann gamla gardan, sum er møtt, sigur Páll Hansen, og sipar til, at meðalaldurin hjá fundarluttakarunum mann liggja nakað omanfyri tey hálvthundrað, hóast nógvir nýútbúnir maskinmeistarar leggjast til limaskarðan á hvørjum ári.

– Nei, eg dugi ikki at siga tað, men tað kann hugsast, at fleiri setast aftur, tí hetta vikuskifti eru nógvar konfirmatiónir, heldur hann.

Páll hevur verið formaður síðani í 2007. Men hann hevur sitið í nevndini nógv longri enn tað, og hevur verið



*Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum*

á hvørjum aðalfundi seinastu 25 árini ella væl tað. Og hann minnist ongan aðalfund, har so fáir limir eru møttir.

### Onki formansval á skránni, – tað ávirkar undirtøkuna

– Nú kann tað jú eisini hugsast, at tað er tí, at formansval ikki er á skránni hesaferð, leggur Páll Hansen afturat. Formaðurin skal veljast triðja hvørt ár, og formansval var í fjør. Tá formansval er á skránni, møta altíð fleiri.

Orðstýrari á fundinum var Sjúrður Heinesen.

Tá so fáir limir vóru møttir var eisini skjótt at manna nevndina. Tveir limir stóðu fyri vali. Annar teirra tók ikki við afturvali, bert ein annar hevði boða frá, at hann vildi stilla upp til valið, og hóast roynt varð at fáa onkran av fundarluttakarunum at stilla upp, so endaði valið við ongum vali, tí einans tveir bjóðaðu seg fram.

### Nevndarval

Í nevndina vóru tí valdir Regin Olsen (afturvaldur) og Jón T. Johansen (nývaldur) meðan Ólavur Gunnarsson fór úr nevndini. Til tiltakslimir vórðu valdir Sam Wang og Jákup Jacobsen.

Roknskapur felagsins vísir ein vinning í 2012 uppá 443 túsund krónur. Tað er meir enn árið fyri, tí inntøkur frá limagjaldi eru hækkaðar meðan útreiðslurnar samlað eru lækkaðar.

Felagið er væl fyri, og fíggjarjavnin er 6,9 milliónir krónur, harav er eginpeningurin 5,8 milliónir krónur.

Í roknskapinum sæst eisini, at Maskinmeistarafelagið eigur 25% av nýstovnaða felagnum Sp/f Fakfelag, sum hevur til endamáls at ogna sær tryggingarfelagið LÍV.

# Formansfrágreiðing fyri 2012

### Fiskiflotin

Tá makrelfiskiskapurin tók seg upp í 2012 gjørdu manningarfeløgini eina makrelavtalu fyri Høgaberg, har manningin fekk fasta daghýru, meðan skipið virkaði sum móttøkuskip, 2.300 kr. x partsbýti.

Tá skipið fiskaði sjálvt, bleiv sáttmálin fyri ídnaðarskip brúktur. Hendan avtalan riggaði sera væl.



Nógv tann stórsti parturin av skipunum, sum hava fiskað makrel í fjør hava fylt teimum sáttmálum, sum hoyra til teirra skipabólk.

Maskinmeistarafelagið er av teirri meining, at bert føroysk skip við føroyskum lønarlagi eiga at fáa loyvið at fiska makrel.

Veiðitíðin eftir makreli byrjar skjótt aftur. Eitt avgjald er lagt á makrelveiðina í ár, ein av størstu trupulleikunum í fjør var hjáveiðuprosenti av sild. Enn er Fiskimálaráðið ikki komi við nakrari ábending, hvussu hettar verður loyst í ár. Við ársskiftið gingu allar avtalur fyri fiskiskip út. Avtalan fyri nótaskip varð framlongd. Samráðingar byrjaðu um hálvan januar, og skjótt gekst at fáa avtalu fyri verksmiðjutrolarar og bólkin línuskip. Í hesum báðum bólkum hevur oljan verið inni í fleiri ár. Verksmiðjutrolarar heilfrysta nú eisini ein part av veiðuni.

Viðvíkjandi línuskipum ásannaðu partarnir, at torført er til tíðir at fáa føroyska manning, tí vóru partarnir samdir um, at seta ein arbeiðsbólk at arbeiða við hesum máli.

Meira striltið gekst við samráðingunum við partrolararnar. Her vóru vit noyddir at boðsenda semingsmanninum. Semingin gekk væl og eftir 12 tímum var ein semja gjørd.

Maskinmeistarafelagið var væl nøgt við hesa semju. Felagsreglurnar vórðu undirskrivaðar og gjøgnumskygni var nú blivið betri viðvíkjandi oljuni. Samstundis bleiv eisini leisturin lagdur.

Eftirfylgjandi samráðingar blivu av tí sama einklari, leisturin bleiv tann sami. Fleiri av okkara skipum í heimaflotanum eru illa fyri og geva hall. Hettar er ikki gott fyri nakran, so ein tillaging er neyðug, um flotin skal yvirliva.



Regin Olsen hevur verið næstformaður í mong ár

## Endurskoðan av lógini um vinnuligan fiskiskap

Nakað eftir ólavsøku 2012, var vinnan – har í millum manningarfeløgini kallaði inn til fundar í Fiskimálaráðnum, har vit fingu at vita, at løgtingið nú hevði sett sær fyri at endurskoða allan fiskivinnupolitikkin. Við øðrum orðum skuldi allur fiskivinnupolitikkurin dagførast. Vit fingu at vita, at arbeiðið bleiv skipað sum verkætlan í Fiskimálaráðnum og feløgini skuldu verða sparrings-



*Nevndarborðið*

partnarar, men tað hava vit so onki merkt til.

Sum eitt stig á leiðini bleiv fiskivinnuting skipað í november. Hetta mál hevur bæði í fjør og higartil í ár fylt nógv á tí politiska pallinum. Síðan er tað hent, at løgtingið hevur trýst á pausu.

## FMU

FMU luttók á fundi hjá ITF í Keypmannahavn í oktober. Hesin fundur var ein kunningarfundur um støðuna í FAS, nú FAS hevur verið FOC hentleikaflagg í gott eitt ár. Nøkur skip eru flaggaði inn í FAS, sum nú hevur nøkur og 80 skip, men annars er ikki nógv hent.



*Nógv var at seta seg inn í á fundinum*

Vit kunnu gleðast um, at alsamt fleiri føroyingar fáa størv á FAS skipum og at tað legst til við føroyskum skipum. Skansi Offshore hevur nú fýra skip, mannaði við føroyingum. P/F Krúnborg eru við í einari í ítøkiligari ætlan um nýbygning. P/F Thor hevur eisini ætlanir um at víðkað og hetta fegnast vit um.

Landsstýrismaðurin hevur lovað at broyta FAS lógina, so hon livir upp til krøvini hjá ITF. Tað snýr seg um samráðingarrættin fyri útlendingar, ið sigla í FAS.

Tað hevði hjálpt nógv fram í móti at sleppa av FOC listanum um hendan lógarbroyting bleiv gjørd.

Annar trupulleiki er, at yvir 50% av skipunum í FAS hava útlendskan eigarar.

Fyrst í februar fingu vit frá ITF umboðsmanninum í Íslandi áheitan um at hjálpa manningini á skipinum Saga, sum lá á Skálafjørðinum, reiðaríið var farið á húsagang. FMU hevur verið sera virki í hesum máli. Vit hava millum annað tikið arrest í skipinum. Hettar fyri at tryggja tí útlendsku manningini teirra hýrukrøv.

FMU fekk transport frá teimum monnunum, sum vóru umborð og reistu hesir heim stutt eftir og hava vit fingið transport frá øðrum síðani.

Her hava vit eitt dømi, hvussu FAS ikki skal vera. Skipið liggur á Skálafjørðinum og tað finst ongin føroyskur stjóri fyri hetta skip. Mær vitandi er hettar ólógligt eftir FAS lóggávuni.

# MASKINMEISTARAR Á AÐALFUNDI



*Nógvar atkvøðugreiðslur vóru á aðalfundinum*

Eitt hugskot kundi verið, at myndugleikarnir settu pening av FAS inntøkuni í ein grunn til at hjálpa útlendskum sjófólki, sum koma illa fyri við føroyskum FAS skipum.

## Reiðarafelagið fyri Farmaskip

Hesin sáttmálin gekk út 1.mars í ár. Fyrsti óformelli fundur var fyrst í februar. Har tosað bleiv um eina tíðarætlan fyri samráðingarnar. Stóri trupulleikin her er tann stóri munurin millum hýrurnar hjá okkum og so okkara grannalondum, serliga við skipum í frálandavinnuni.

Tann 11. februar blivu so sáttmálakrøv framløgd og fleiri fundir hava verið millum partarnar síðan tá, men striltið hevur gingist, tá vit hava tosað um lønina. Her er kravið frá manningarfeløgunum, at man skal síggja, at lønin nærkast lønarlagnum í okkara grannalondum serlig innan frálandavinnuna.

Partarnir hava fyribils framlongt sáttmálan til 1 mai. Samráðst verður í løtuni, men í minni bólki.

## Strandferðslan

Tann 1. januar í ár kom løgtingslóg um hvíldartíð hjá sjófólki í gildi. Hendan lógin umfatar tó ikki fiskiflotan. Strandferðslan bað um undantøk frá hvíldarreglunum fyri øll skipini. Maskinmeistarafelagið var av teirri meining, at man skuldi gera sær ómak, so øll skipini hjá Strandferðsluni kundu sigla uttan undantøk so, at ferðafólk altíð kunnu føla seg trygg, at manningin hevði fingið tað neyðugu hvíldina og at trygdin um firðir og sund var í hásæti.,

Partarnir avtalaðu at leingja verandi arbeiðsætlanir fram til 1. Apríl, meðan man arbeiddi við hesum.

Her hevur tað víst seg at vera sera trupult hjá Strandferðsluni at fáa arbeiðstíð og hvílitið at hanga saman. Nakrir fundir hava verið og ymiskar arbeiðsætlanir gjørdar, men striltið hevur gingist, at fáa hettar uppá pláss.

Felagið hevur givið frávik til Teistan og Ternuna, fyribils fram til 1 oktober.

## Alment lønt á landi og sjónum

Hesir sáttmálar ganga út 1. oktober í ár. Vit kunnu skjótt blíva samd um, at innan hettar økið eru flestu lønirnar for lágar um samanlíkna verður við starvsfelagar í okkara grannalondum ella siglandi meistarar.

Í okkara grannalondum hækka lønirnar árliga við millum 2 og 3 % í løtuni.

Tann sokallaði karmurin her hjá okkum liggur væl niðan fyri hetta, so munurin bara veksur og hevur fráflyting við sær.

Ofta blíva hugtøk sum framflyting og umflokking nýtt.

Felagið tekur undir við øllum umflokkingum, tá hesar eru lýstar við munandi starvsbroytingum og har starvsinnihaldið er grundleggjandi broytt, eitt nú økt ábyrgd av teimum uppgávum, sum higartil hava hoyrt til arbeiðið.

## Tryggingarfelagið LÍV

Fyri gott einum ári síðan møttust 23 fakfeløg á Hotel Hafnia fyri at tosa um eitt eventuelt keyp av LÍV. Semja var um at fara undir kanningar av hesum keypi og ein arbeiðsbólkur bleiv settur.

MF fekk umboð í hendan arbeiðsbólk og tað vísti seg, at Maskinmeistarafelagið var fimt største felag í LÍV upp



*Atkvøðuseðlar verða taldar*



*Høvi var eisini til prát*



*Jóan Petur Patursson samlar atkvøðuseðlar*



*Tiltakslimir vórðu valdir. Sam Wang og Jákup Jacobsen*

á táverandi tíðspunkt. Longu í mai handaðu fakfeløgini eitt óbindandi boð upp á keyp av 50 % av LÍV, og farið var undir arbeiðið at fyrireika keypið.

Tilgongdin bleiv sera drúgv. Hon fevndi m.a. um eina gjølla kanning og meting av LÍV.

Ein sokalla Due-diligence kanning bleiv gjørd, bæði av løgfrøðingum, grannskoðara og eisini av aktuari.

Kanningarnar vístu, at tað vóru ongi lík í lastini. men fakfeløgini koma ikki til búgvið borð. Tað skal arbeiðast nógv framyvir við LÍV. Um hálvan desember 2012 var komið so langt í hesari tilgongd, at keypið av LÍV kundi fremjast. Ein treytaður keypssáttmáli varð undirskrivaður tann 14. desember um keyp av 50 % av LÍV.

Keypið er treytað av, at Tryggingareftirlitið og avvarðandi myndugleikar góðkenna tað.

Bólkurin av fakfeløgum var tá tódnaður niður í 18 feløg og fyri hesi fakfeløgini er endamálið við keypinum at tryggja limunum eina so góða pensjónsuppsparing, sum møguligt og at P/F Fakfelag er eitt „non-profit“ felag. Tað er hetta felagið, sum vegna fakfeløgini skal eiga 50 % av LÍV. Hettar er eitt spennandi arbeiði við sera nógvum avbjóðingum.

Samstundis fær Ognarfelagið LÍV, sum umboðar allar tryggingartakararnar í LÍV, hina helvtina handaða frá Føroya Landsstýri. Eftir tað skal skipast fyri vali til eitt umboðsráð og síðan veljast eitt ognarfelag,

## Fólkafundur 2012

Fólkafundur 2012 var í Hoyvíkshøllini í september 2012. Manningarfeløgini luttóku í hesum tiltaki. Vit kundu við hesum tiltaki varpa ljós á týdningin hjá feløgunum og samstundis gera okkum meira sjónligar.

Samanumtikið kann ikki sigast annað enn, at vit vóru nøgdir, hóast tað til tíðir var heldur lítið av vitjandi. Endamáli við tiltakinum var, at skifta orð um viðurskifti, sum høvdu áhuga hjá manningarfeløgunum og gjørdu vit hettar við at fáa nakrar persónar at halda fyrilestrar um mál, sum hava týdning fyri manningarfeløgini. At varpa ljós á hjartamál hjá feløgunum og so fáa kjak aftaná. Hesi kjak vóru sera væleydnaði.



*Kári Sigurheim*

## Samlagstryggingin

Við ársbyrjan 2012 yvirtók MF umsitingina av samlagstryggingin fyri bæði yvirmannafeløgini. Her hava vit havt nakrar trupulleikar og vit mugu nokk ásanna, at her bleiv bitin for stórur.

Við ársbyrjan 2013 broyttu vit umsitingina av samlagstryggingini soleiðis, at fyri teir sum gjalda beinleiðis inn í LÍV, verður tryggingargjaldið tikið av eftirlønarinngjaldinum. LÍV mælir til hesa skipan, sum er nógv einfaldari skipan og tryggjar, at allir limir, sum hava eftirløn hjá LÍV, eru tryggjaðir. Fleiri fakfeløg eru farin yvir til hesa skipan. Teir limir, sum ikki hava eftirløn hjá LÍV, hava fingið boð um at gera egna flyting av tryggingargjaldi.

## NMF

Tað hava verið tveir NMF fundir síðan síðsta aðalfund, ein í Keypmannahavn og hin í Stavanger og MF hevur luttikið á báðum.

Vit hava á hesum fundum greitt frá teimum føroysku sáttmálunum, bæði á sjógvi og landi og um støðuni á føroyska arbeiðsmarknaðinum sum heild. Harafturat hava vit greitt frá útbúgvingum og støðuni í FAS.

Á komandi fundi, sum verður í Føroyum í mai, koma feløgini serliga at tosa um útbúgvingar og eftirútbúgvingar í Skandinavia.

Eisini koma vit at gera avtalu um limaskap hjá hvørjum øðrum. Ongin kann tvingast inn í eitt annað felag í Skandinavia t. v. s. at siglir man í Norra, kann man varðveita sín limaskap í Føroyum.

Feløgini skulu eisini seta sær sum mál, at styrkja tað interna samarbeiðið millum londini og styrkja felagsskapin internationalt.

## Útbúgving

Nýggir tónar um útbúgvingar vóru at hoyra á Vinnuháskúlanum, tá nýggjur stjóri bleiv settur og tað fegnast vit um. Eitt nú kom fram, at útbúgvingarnar skulu lyftast upp á bachelorstøði. Tað nýggja her er, at stjórin hevði tankar um, at tað skuldu bera til at leggja bachelor oman á verandi útbúgvingar.

Eisini skulu útbúgvingarnar verða samanhangandi, so at útbúgvingin er í eini natúrligari og samanhangandi tilgongd.

Útbúgving til skip við motorstødd undir 750 KW er ein trupulleiki. Flestu av okkara línuskipum hava motor undir hesa stødd. Í manningarlógini stendur, at motorpassari er kravdur, men hendan útbúgvingin finst ikki. Hetta skapar stórar trupulleikar fyri skip í hesi stødd. Tað er eisini trupult, at fáa meistarar til skip við motorstødd 750 - 1500 KW. Tað er her, man sær nøkur undantaksloyvir.

Vit mugu fáa prógv til útbúgvingar niðan fyri 750 KW og samstundis fáa maskinistútbúgvingina í eina fasta legu.

Maskinmeistaraútbúgvingin skal eisini lyftast upp á bachelorstøði.

Eitt útbúgvingarráð eigur at verða á Vinnuháskúlanum. Hettar hevur verið óvirkið í nøkur ár og tað er sera óheppið og kann ikki góðtakast í eini tíð, har útbúgvingarnar standa fyri broytingum.

Mentamálaráðið sigur, at tað er sera trupult at finna formann til ráðið, tí hesin skal verða uttanveltaður og má ikki umboða feløg ella áhugabólk.

Hettar er eitt sindur óskiljandi fyri okkum. Mentamálaráðið kundi akkurát tað sama sagt at skúlastjórin eigur at verða uttanveltaður, so tað tykist fyri mær, sum hettar bert ein undanførsla hjá teimum.

Høvuðstrupulleikin her er, at Mentamálaráðið hevur niðurpínt hendan skúlan við at lækka játtanirnar nú í fleiri ár. Fylgjan av hesum er manglandi útbúgving til partar av okkara fiskiflota og at teir, sum ætla sær bachelor, velja Vinnuháskúlan frá.

## Skrivstovan, pengar og ognir

Skrivstovan hevur nógv sambond úteftir og tað koma fleiri fyrispurningar til skrivstovuna millum ár og dag. Bæði frá limum, reiðarum og stovnum. Hoyringsskrivum koma tað eisini fleiri av, eitt nú broytingar í ymisk-



*Mannbjørn Joensen*

um løgtingslógum. Stovnar senda eisini fleiri skriv til hoyringar, sum hava við limirnar hjá felagnum at gera, alt hettar skal lesast og gerast viðmerkingar til.

NMF fundur verður í Føroyum í næsta mána og eisini her hevur skrivstovan ein leiklut. Eitt nú skaffa innivist og lokalir og okkurt ábit til gestirnar hjá okkum. Vanligu nevndarfundirnir eru einaferð um mánaðin, umframt kunning um aktuell mál, eru fleiri mál til støðutakan frammi á hvørjum nevndarfundi.

Tað eru eisini aðrir nevndarfundir, tá støðan krevur tað og teir eru ikki so fáir.

Fleiri mál blíva eisini send út til nevndarlimirnar til støðutakan við telduposti. So tað fer nógv samskifti fram millum nevndarlimirnar og skrivstovuna gjøgnum teldupost.

Nevndin hevur í løtuni ongar ætlanir at gera broytingar í limagjaldinum. Limagjaldið fyri virknar limir er 1,2 % av lønini, men 20 % av hesum fara til Stuðulsgrunnin. Felagið er væl fyri fíggjarliga. Roknskapurin blívur framlagdur um eina løtu.

Annars kann nevnast, at onkrar smávegis umvælingar eru gjørdar á ognina við Grønlandsvegin, millum annað eru vindeygu og úthurðapartí skift.

## Mið og Magn

Blaðið er nú útkomið í 4 ár og tað hava verið yvir 60 blaðfundir. Tað hevur ofta verið langur vegur frá hugskoti til eina blaðgrein og fram til at hon er blivin prentað. Man hevur ofta følt, at man líkasum koyrir í einum sirkli og tilfarið er gamalt, tá tað kemur út.

Vit klára ikki at fylgja skjóta tíðindastreyminum og tí hava feløgini í eina tíð umhugsa at gera ein Mið og Magn portal. Hesin portalur skal serliga fokusera uppá viðkomandi tíðindi innan arbeiðslívið og vinnumøguleikar hjá limunum og hava viðmerkingar til aktuell mál, sum hava við yrkið hjá limunum at gera og føra okkara áskoðanir fram.

Kunningarparturin um feløgini skal eisini styrkjast. Enn eru tó bert talan um tankar, so gott hevði verið at fingið nakrar viðmerkingar um hetta.

## Maskinmeistarar uttan vinnubræv

Tað kann verða sera trupult at fáa fyrsta vinnubrævið hjá monnum, tá teir koma út frá skúlanum.

Í sáttmálanum fyri farmaskip er ein paragraff fyri maskinmeistarar uttan vinnubræv og í nýggju lønartalvuni er hetta eisini komið at standa.

Felagið roynir eisini við dialogi at fáa reiðarar, sum hava tey stóru skipini í okkara fiskiflota at taka menn uttan vinnubræv umborð til maskintænastu, so at hesir fáa sítt fyrsta vinnubræv og koma víðari.

## Fasti gerðarrætturin

Maskinmeistarafelagið hevur verið limur í Fasta gerðarrættinum nú í nøkur ár og hava vit í 2012 fyri fyrstu ferð lagt mál fyri hendan rættin. Tað eina málið snýr seg um telefonvakt og hitt um eftirlønarviðurskiftir. Okkara mótpartur í hesum málum er Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum. Í málinum um eftirlønarviðurskiftini bað Lønardeildin okkum um eina semju áðrenn málið kom til dóms. Vit tóku av semjuni, tí Lønardeildin gekk okkara krøvum á møti. Tað er eisini ein partur av skipanini, at til ber at semjast áðrenn dómur fellur. Vit fegnast um at í 2012 eru hini bæði manningarfeløgini eisini blivin limir í Fasta gerðarrættinum.

## At enda

Maskinmeistarafelagið er av teirri meining, at framtíðin fyri maskinmeistarar sær góð út. Vit ásanna tó, at størstu møguleikarnir liggja uttan fyri 200 fjórðingar. Feløgini í okkara grannalondum siga at tey kenna ikki til arbeiðsleysar maskinmeistarar.

Internationalt veksur tørvurin á maskinmeistarum, men tað er nokk Norra, sum dregur mest maskinmeistarar til sín, ikki bert úr Føroyum, men eisini úr hinum skandinavisku londunum.

## Gulak Gulaksen:

# Bara framhaldandi vánaligt

Gulak Gulaksen hevur drúgvar royndir við trolbátinum, sum í dag ber navnið Olga Maria. Báturin er 25 m. langur og er merktur til 100 tons. 19. mars 1997 mynstraði hann sín fyrsta túr umborð, og førdi bátin – út í eitt – í samfull 10 ár. Í februar 2011 keypti hann bátin frá Norðoya Sparikassa fyri 8 mió. kr. Tá fekk hann navnið Olga Maria. Annars hevur báturin haft onnur nøvn og aðrar eigarar.

Vit hava sett stevnu í Leirvík, har Gulak Gulaksen býr, og leggja fyri við at spyrja um hann minnist onkran serliga góðan ella serliga vánaligan túr. Gulak velur tann jaliga møguleikan og svarar, at tað er ein túrur, sum enn stendur sólarklárur í minninum.

Tað var í januar 2001. Vit vóru seinir út, klokkan var hálvgum tíggju á kvøldi, tá ið fyrsta trolið var skotið, men longu ein tíma seinni var trolið aftur á dekkinum, tað gav 4.000 pund.

Hálvan annan tíma fyri midnátt varð aftur kastað; og hálvan annan tíma seinni høvdu vit trolið aftur á dekkinum, tað tóvið gav 15.000 pund – so at siga alt var stórum toskur.

Trolið varð skotið aftur kl. 2 og umleið kl. 3.30 varð hálað aftur; tað gav góð 20.000 pund.

Kl. 4. var klárt aftur at kasta; tað ferðina var trolið úti í hálvan annan tíma. Men tá vóru vit óhepnir; trolið skrædnaði í sliskuni, og alt fór aftur í havið. Vit mettu tað til 20.000 pund. Eina slíka løtu er hugurin tungur.

Tá klokkan var 6.30 varð nýtt trol gjørt klárt og kastað. Tað gjørdist eitt av teimum frægu hálunum; tað lág um 40.000 pund.

Um fimmtíðina vóru vit lidnir at kryvja.

Eftir tað gjørdu vit tvey stutt tóv, sum tilsamans góvu um 20.000 pund.

Tann túrin avreiddu vit smá 110.000 pund. Hetta stendur sólarklárt í mínum minni; sølan gav 1,3 mió. kr. Tað rokni eg ikki við at uppliva aftur.

Tey árini – fram til 2005 høvdu vit fleiri sera góðar túrar, men ongan so góðan sum handan í 2001.

Fyri at vísa á, hvussu vánalig støðan hevur verið seinastu árini kann eg nevna, at vit í 2011 illa nokk megnaðu at avreiða fyri meira enn knappar 5. mió. kr. Til samanberingar avreiddu vit í 2006 fyri eitt stað ímillum 9 og 10 mió. kr.

Harumframt eru tað altíð tveir faktorar inni í myndini, sum vit onga ávirkan hava á; eg hugsi um fiskaprísin og oljuprísin. Í dag eru hesir faktorar so sterkir, at fleiri bátar eru lagdir, tí tað loysir seg betur at liggja svínabundin enn at fiska. Vit kunnu spyrja um tað verður tann, sum liggur svínabundin, ið verður tann sterkari í longdini ?

### Fiskurin mest sum hvørvur

Í 2005 merktu vit, at minni var til av fiski, og síðani hevur tað bara gingið skeiva vegin hjá øllum, sum fiska undir Føroyum. Í dag fiska vit bert ein lítlan brotpart av tí, sum vit fyrr kundu fáa.

Vit vónaðu sjálvandi at fiskur fór at vera skjótur aftur á grunnunum, men tá tað ikki hendi, hevði eg

## Fiskaprísir, rogn og olja

Skal eg greiða frá, hvussu ymisk støðan hjá fiskimanninum kann vera, kunnu vit nevna, at tá prísurin er góður verður toskur nr. 1 seldur fyri gott og væl 30 kr. kg. Í dag liggur hann um 12-13 kr. kg.

Og hýsan, sum vit hava selt fyri omanfyri 20,- kr. kg. selja vit í dag fyri millum 7,- og 12 kr. kg.

Og prísurin á rognum má ikki undirmetast; tá hann er frægur kunnu vit fáa 56,- kr. fyri kg., og nú hevur prísurin ligið niðri á 6 til 8 kr. kg. Tá rognaprísurin var í hæddini avreiddu vit onkran túr fyri gott og væl 133.000 kr. bara í rognum.

Og tá tað kemur til olju, so er „liturforbrúkið" mest sum tað sama hjá okkum um fiskiskapurin er góður ella vánaligur. Og so kann ein og hvør siga sær sjálvum, hvussu nógv oljan tyngir nú fiskiskapurin er vánaligur og oljuprísurin er so høgur sum valla nakrantíð áður.

bestan hug at sleppa mær av við bátin, sigur Gulak álvarsamur. Tá var eg koyrdur troyttur.

Og tá Jónsvein Knudsen í 2007 bjóðaði mær 18 mió. fyri bátin tók eg av. Hetta var sama upphædd, sum eg hevði keypt bátin fyri frá Osmundi Justinusen.

Lat meg undirstrika, at vit eiga at gera okkum greitt, at fiskiskapur í føroyskum sjógvi, altíð kemur at ganga upp og niður.

## Ymiskir eigarar

Søgan um bátin, sum í dag eitur Olga Maria er tann, at hann er bygdur í 1984 í Fraklandi. Hann er 25 m. langur og er merktur til 100 tons. Tað var p/f á Bakka í Leirvík, sum lat bátin byggja í Fraklandi. Teir áttu bátin í tvey ár; fram til september 1986, tá teir seldu hann til Osmund Justinusen.

Osmund nevndi bátin Sjóborg og átti hann í samfull 20 ár, frá 1986 til 2006.

Gulak greiðir okkum frá, at hann mynstraði fyrstu ferð við Sjóborg tann 19. mars 1997. Og 1. apríl 2006 keypti hann bátin frá Osmundi fyri 18. mió. kr.

Gulak var nú bæði eigari og skipari, og í hesum sambandi fekk báturin navnið Raðhamar.

Sum áður nevnt seldi Gulak bátin til Jónsvein Knudsen í september 2007, tá fekk hann navnið Sigrun. Tí verri gjørdist fiskiskapurin so vánaligur, at Jónsvein gav skarvin yvir, og báturin varð lagdur í 2009.

Í 2011 fekk Gulak aftur hug at royna seg, og tá tað stóð honum í boði at keypa bátin aftur fyri 8. mió. kr. tók hann av. Tað var í apríl 2011.

## Veruleikin um fiskastovnar

Gulak greiður okkum nú frá, at hann er ikki tann, sum trýr uppá, at ovurveiða er orsøkin til vánaliga fiskiskapin undir Føroyum í løtuni. Hann hellur meira til, at tað eru so mong ymisk viðurskifti, sum ávirka fiskastovnarnar. Og í løtuni meti eg, at tað eru so mangir faktorar, sum ávirka skeiva vegin.

Til dømis hevur hiti og kuldi stóra ávirkan á fisk. Tey árini vit høvdu sera góðan fiskiskap legði eg til merkis, at hitin á botni vanliga lág ímillum 6,3 og 7,3 hitastig. Seinni varnaðist eg, at sjógvurin á grunn-



*Gulak Gulaksen er skipari og eigari av Olgu Mariu*

unum hitnaði nógv, onkuntíð var hann omanfyri 10 stig, men nú er hann aftur fallin. Hann er komin heilt niður á 6,7, og tí ivist eg ikki í, at fiskiskapurin aftur fer at batna.

Fyri mær sigur tað seg sjálvt, at botnfiskur – fyri ikki at siga alt lív í havinum – verður ávirkað av so stórum broytingum.

Og fara vit nøkur 100 ár aftur í tíðina so hava vit prógv fyri, at fiskaloysi var ávís ár undir Føroyum, hóast veiðuorkan tá var lítil og ongin.

Eg plagi eisini at hugsa um fuglastovnarnar, serlig lomvigan og lundan, teir kunnu ikki liva har, sum ongin føði er. Teir leita sær aðrar leiðir, og eg gangi út frá, at fiskurin ger tað sama.

Í hesum sambandi havi eg hug at nevna, at vit í seinastuni hava lagt til merkis, at meira nebbasild er í fiskinum. Onkur hevur helst – í skemti – hug at spyrja um tað ikki er nebbasildin, sum heldur vil hava tann kaldara sjógvin, sigur Gulak skemtandi.

Tað merkist, at hann er vísur í síni søk, og heldur fram har hann slepti.

Fyri mær tikist tað sum um fiskimaðurin og fiskifrøðin eru meira samd um, at tað eru so nógvir faktorar inni í myndini í løtuni, greiðir Gulak frá. Serfrøðin kann bara ikki siga okkum nær fiskur kemur aftur á grunnarnar, og tað sigi eg teir ikki ringar fyri, tí tað kann eg heldur ikki siga fyri vist. Fiskifrøðingar hava veruliga eina tunga byrðu at lyfta. Tað er sum við ísfjallinum, nógv tann største parturin er undir vatnskorpuni, og tann partin síggja vit so at siga ikki.

## Undrið í nítiárunum

Sum allir fiskimenn vita, so var eitt tíðarskeið í nítiárunum við vánaligum fiskiskapi. Tá metti øll fiskifrøðin – um okkara leiðir – at støðan var so álvarsom, at onki mátti fiskast av toski undir Føroyum. Tá vóru okkara politikarnar hært kroystir, teir vildu kortini ikki taka so rívan til, og samdust tí um at seta TAC av toski til 6.000 tons.

Men so hendi tað sum ongin fiskifrøðingur hevði roknað við. Brádliga var ovmikið av stórum botnfiski at fáa undir Føroyum. Nú vóru øll ovfarin, men ongin dugdi at svara hvaðani hesin fiskurin var komin.

Men Gulak heldur ikki, at hetta er so torført at greiða frá, hann sigur seg vera fullvísan í, at hesin fiskur fylgdi føðini úr norskum og íslendskum øki inn í føroyskt farvatn.

Eg haldi eg at enda má skoyta uppí, at føroyskir fiskimenn av royndum vita, at fiskur kemur aftur á grunnar okkara, spurningurin er bara nær tað hendir. Tann sum ikki hevur slíkan hugburð, hann trívist ikki í føroyskari fiskivinnu.




*Olga Maria er bygd í Fraklandi í 1984 til p/f á Bakka í Leirvík, tá varð hann nevndur Bakka Jógvan.*

*Í september 1986 keypti Osmund Justinusen bátin, og gav honum navnið Sjóborg. Osmund átti bátin í samfull 20 ár. 1. apríl 2006 keypti Gulak Gulaksen bátin frá Osmundi fyri 18 mió. Í september 2007 seldi Gulak bátin til Jónsvein Knudsen fyri 18 mió. Tá fekk hann navnið Sigrun. Í 2009 varð báturin lagdur. Í februar 2011 kom Gulak Gulaksen aftur inn í myndina, tá keypti hann bátin frá Norðoya Sparikassa fyri 8 mió. kr., og gav honum navnið Olga Maria. Manningin telur 4 ella 5; tað er í mun til fiskiskap.*

Eik




# Lyklaklár bilfígging á staðnum

## - skjótt og lætt

Tá tú keypir nýggjan bil, kanst tú fáa bilfígging frá okkum beinleiðis á bilasøluni.

Vit samstarva við nakrar av landsins størstu bilasølum, og veita nú fígging og billykil í somu vending.

Samstundis hava vit lækkað rentuna á billánum. Lægsta renta á billánum er nú **5,5 prosent**.

Hoyr nærri á bilasølunum ella les meira á **www.eik.fo** um nýggju bilfíggingarmøguleikarnar hjá Eik.

Bilfígging frá Eik fæst á hesum bilasølunum:

WAAG & COMPANY

Auto Service

REYNI SERVICE P/F

P/F WENZEL

Bilasølan

BERG MOTORS Bilar til øll.

Tel 348 000 www.eik.fo

# Svørt lomb í FAS

– Óseriøsir aktørar eru í Føroysku Altjóða Skipaskrásetingini, og vit mugu ansa eftir, at teir ikki máa støðið undan skipanini. Formaðurin í Føroya Skipara og Navigatørfelag sær tó tekin um batar í nýggju Maritime Labour Convention avtaluni, sum leggur ábyrgdina á flaggstatirnar.

*Eftir Gunnar Skúvadal*

Í Søldarfirði liggur útlendska farmaskipið Saga svínabundið, tí føroysku manningarfeløgini hava framt arrest í skipinum. Tað hava tey gjørt, tí manningin umborð, sum ikki hevði fingið løn í fleiri mánaðir, kærdi sína neyð og eftir øllum at døma ongan góðan átti at fara til. Hetta er ikki fyrstu ferð, at føroysk manningarfeløg fremja arrest í einum skipi, tí reiðaríið velur at hava skipið siglandi, hóast tað er langt afturút við lønargjaldingum. Men hetta er fyrstu ferð, at føroysk manningarfeløg hava gjørt arrest í einum skipi, sum er skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskrásetingini, FAS.

## Óseriøsir aktørar

Eyðstein Djurhuus, formaður í Føroya Skipara og Navigatørfelag sigur, at hetta er fyrsta ferðin at føroysk manningarfeløg taka slík stig fyri onnur enn sínar egnu limir. Føroysku manningarfeløgini valdu at taka hetta higartil óvanliga stigið, tí áheitan kom frá ITF (International Transportworker's Federation).

– Støðan var tann, at manningin umborð á Saga, sum fyri tað mesta var úr Russlandi og Litava, hóast reiðaríið er íslendskt, hevði ikki fingið løn síðani í november mánað, sigur Eyðstein Djurhuus.

Felags fyri eysturlendingar er, at teir ofta hveppa seg við at fara av einum skipi, har reiðaríið skyldar teimum løn, tí teir eru bangnir fyri at missa pengarnar. Álitið á skipanina er kanska ikki so stórt, og teir bera bangheit fyri, at teir ongantíð fara at frætta nakað aftur, fara teir av skipinum. Hartil kemur so tað, at fleiri teirra ongar pengar hava, so teir hava ongan møguleika at keypa sær ein ferðaseðil heim.

### ITF og FMU

Mong ár eru liðin síðani føroysku manningarfeløgini tóku stig til at stovna felagsskapin Faroese Maritime Union, stytt FMU. Feløgini dugdu at síggja, at tørvur var á einum felagsskapi, sum kundi umboða áhugamálini hjá feløgunum úti í heimi. FMU hevur m.a. samstarvað við International Transport Workers Federation, stytt ITF. Talan er um ein stóran, breiðan altjóða felagsskap, sum t.d. eisini hevur eina fiskivinnudeild.

Fyri einum góðum mánað síðani vendi ITF sær til FMU í sambandi við, at manningin á einum skipi, ið er skrásett í FAS, ikki hevði fingið løn í fleiri mánaðir.

Um hetta mundi var skipið, ið nevnist SAGA, statt í føroyskum sjógvi. Tað var í hesum sambandi, at ITF vendi sær til FMU, og spurdi um trupulleikin hjá manningini kundi loysast í Føroyum. FMU metti støðuna at vera álvarsama, og at neyðugt var at veita manningini hjálp. Tað var orsøkin til at FMV tók stig til at hjálpa manningini.

– Soleiðis gerst støðan hjá teimum bara verri og verri, og vit hava sæð nógv dømi um útlendsk skip í Føroyum, har reiðaríið hevur slept endanum, men manningin framvegis er umborð, slept uppá fjall, sigur Eyðstein Djurhuus.

## Lagt eina millión út

Heilt ítøkiliga hava føroysku manningarfeløgini lagt umleið eina millión krónur út, so manningin á Saga kundi fáa sína løn og sleppa heim. Fyri at fáa pengarnar, sum jú eru ogn hjá limunum í føroysku manning-



Saga við bryggju á Glyvrum

arfeløgunum, aftur, verður arrest framd í skipinum. Fólk frá dómaraskrivstovuni hava verið umborð á Saga og kunngjørt fyri skiparanum, at arrest er framd, og at hann tí ikki sleppur úr aftur Føroyum við skipinum, fyrr enn hesi fíggjarligu viðurskiftini millum partarnar eru avgreidd. Tá arrrest er framd, skal reiðaríið stevnast innan 8 vikur. Í stevningini verður reiðaríið kravt eftir at viðurkenna lønarkravið. Síðan kann úttøka gerast í skipinum við at lýsa tað á tvang.

### Landið ábyrgdina

Altjóða sjólóg ásetir, at lønarkrøv liggja ovast í dunganum av krøvum, um eitt reiðarí ikki heldur sínar skyldur, so tí er tað ikki nakar stórur vági fyri at missa pengarnar, sum føroysku manningarfeløgini í hesum førinum taka á seg, við at leggja út fyri lønina hjá eysturlendsku sjómonnunum, metir Eyðstein Djurhuus.

– Hetta hevur ITF javnan gjørt eftir áheitan frá okkum, móti føroyskum skipum, sum ikki hava hildið sínar skyldur. Hann heldur kortini ikki, at tað átti at verið skylda hjá føroysku manningarfeløgunum at hildið í oyruni á reiðaríum, sum hava latið síni skip skráseta í Føroysku Altjóða Skipaskránni.

– FAS skipanin skuldi sjálv syrgt fyri, at óseriøsir aktørar ikki kendu seg heima í skipanini, sigur Eyðstein Djurhuus.

Hann fegnast tí um nýggju ásetingarnar í Maritime Labour Convention samstarvinum, sum er millum teir ymisku flaggstatirnar. Har verður greitt definerað, at tað er flaggstaturin sjálvur sum hevur ábyrgdina av sjómonnum, sum eru komnir illa fyri í fremmandari havn, tí reiðaríið hevur slept endanum.

Nýggju ásetingarnar í Maritime Labour Convention fara at virka í august 2013.

# Stjórin í FAS: Konkursi sleppa vit ikki undan

*Hans Johannes á Brúgv fær ikki svøvnleysar nætur av tí, at føroysku manningarfeløgini hava framt arrest í einum skipi, sum er skrásett í FAS. – Konkursur er ein partur av øllum vinnum, sigur hann.*

Nú skal tað ikki skiljast soleiðis, at nýsetti stjórin á Føroysku Altjóða Skipaskrásetingini tekur ímóti reiðaríum við opnum ørmum, sum ikki fylgja spælireglunum, og halda hánt um skyldurnar at avrokna manningini regluliga løn. Men hann vísir á, at tað, at reiðarí fara á húsagang, og skip skifta eigara, altíð hevur verið ein partur av øllum vinnum og eisini shipping vinnuni.

– Hesum sleppa vit ikki undan, og so hvørt sum skipanin veksur, og alt fleiri koma við í skránna, so økist eisini vandin fyri at óseriøsir aktørar' eru ímillum, sigur Hans Johannes á Brúgv.

Í hesum ítøkiliga førinum, har føroysku manningarfeløgini hava framt arrest í „Saga" kunnu vit sambært stjóranum í FAS fegnast um, at skipið var statt í Føroyum, tá arrestin varð framd.

– Ofta síggja vit, at góðskan á innaneftirlitinum hjá einum reiðaríi versnar uppundir ein konkurs. Líkasælan veksur, umsitingin av skips- og manningarskjølum livir ikki upp til krøvini, tað gongur út yvir trygdina, og tá er vandin stórur fyri, at skipið kann verða afturhildið í fremmandari havn í einum 'port state control' eftirliti. Tað hevði givið okkum ringa umtalu av FAS skipanini og í ringasta føri viðført at vit „rykkja" niður á gráa lista, sigur Hans Johannes á Brúgv.

Hann minnir eisini á, at tað verða sett krøv til reiðarí, sum vilja sleppa at flagga síni skip inn í Føroysku Altjóða Skipaskrásetingina. Skipið og viðkomandi skjøl verða kannað, um tey lúka kravið um føroyskan agent verður somuleiðis kannað, umframt at sjálvt reiðaríið og tess umsiting og mannagongdir **eisini verður kannað.**

*– Men er tað ikki ov lætt sloppið, at siga at hetta mugu vit tola. Ger FAS nóg nógv fyri at fora hesum í at henda?*

– Tað kunnu vit so sjálvandi altíð kjakast um. Tað eg royni at siga er, at hetta er ikki óvanligt heldur ikki í øðrum slíkum skipaskráum. Um læran frá „Saga" er, at vit skulu stramma onkrar av okkara mannagongdum, dugi eg ikki at siga enn. Vit koma at eftirmeta hesa støðu og gera neyðugar tillagingar um tørvur er á tí, sigur Hans Johannes á Brúgv at enda.

## Nýggi stjórin í Sjóvinnustýrinum

# Vit skulu hava eina 0-hugsjón á sjónum



Nýggi stjórin í Sjóvinnustýrinum, Hans Johannes á Brúgv, ætlar at taka uppgávuna um trygd á sjónum í størsta álvara. Hann hevur fingið íblástur frá Ráðnum fyri Ferðslutrygd og hevur eina hugsjón um, at ongin skal doyggja ella fáa skaða á sjónum. Vit hava hitt Hans Johannes á Brúgv til eitt prát um visjón, strategi og mál.

*Eftir Gunnar Skúvadal*

1. januar setti nýggjur stjóri seg í stjórastólin hjá Sjóvinnustýrinum í Miðvági. Hans Johannes á Brúgv er ikki nakað ókent navn innan sjóvinnu í Føroyum. Hann hevur leingi fylgt við frá ovastu rók, fyrst sum Fiskasølustjóri, síðani sum stjóri hjá O. C Joensen, seinni sum stjóri í Vinnuháskúlanum, og í dag sum stjóri á stovninum, sum skal borga fyri lóg og landaskili á sjónum, Sjóvinnustýrinum. Á bókligu síðuni er hann skipsførari og frá í fjør at rokna eisini MBA – Master of Business Administration. Og so er Hans Johannes á Brúgv heldur ongin ársungi, hann fyllir hálvthundrað 1. juni 2013.

*– Tú hevur klárað at fáa fleiri stjórastørv og onnur álitisstørv einans við útbúgvingini sum skipsførari í fikkuni. Kortini valdi tú at fáa tær eina akademiska útbúgving afturat. Hví gjørdi tú tað?*

– Praktisku útbúgvingarnar eru ikki at forsmáa, og tað er lívsins skúli heldur ikki. Men hóast lærdómur kann vera tungur at ogna sær, so er hann lættur at bera, og so man tað helst eisini vera ein sannroynd, at fleiri dyr lata seg upp fyri tær, jú fleiri og betri pappír tú hevur at vísa á.

*– Hvussu fer sjófólkið í Føroyum at síggja, at Sjóvinnustýrið hevur fingið nýggjan stjóra?*

– Eg vil fegin, saman við sjófólkinum, gera sjógvin til eitt tryggari og betri stað at starvast í. Nógv av tí, sum vit gera hevur við trygdina at gera. Eitt mál hjá okkum verður at fáa sjófólkið at hugsa um trygdina sum sína trygd. Eg havi eisini eitt ynski um at vit skulu hava eina 0-hugsjón á sjónum eins og í ferðsluni á landi. Tað vil siga, at ongin skal doyggja ella koma til skaða á sjónum. Tað má vera málið. Annars halda vit sjálvsagt á við arbeiðinum at verja umhvørvið og rættindini hjá okkara viðskiftafólkum, sum eisini er við í sjálvari endamálsorðingini fyri stovnin.

*– Hvussu skulu vit røkka málinum um eina 0-hugsjón?*

Sum nevnt er nokk rættast at gera trygdina til ein meira persónligan spurning, sum hvør einkultur skal vera við til at taka ábyrgd og seta krøv til trygdina umborð.

*– Tær dámar væl møguleikarnar í nýggjari tøkni. Á hvønn hátt fer tøknin at broyta arbeiðsgongdina her á stovninum?*

Tøknin fer at broyta arbeiðsgongdina hjá okkum, og fer at gera, at vit fáa betri stundir til aðrar uppgávur. Til dømis skriva vit 1.300 vinnubrøv út árliga. Hetta kunnu vit eitt nú gera nógv lættari við nýggjari tøkni, tí sum er sita vit og gera hetta arbeiðið manuelt og tað fer við nógvari tíð og orku. Eg síggi fyri mær, at hetta verður lagt meira út til tann einkulta at umsita. Til dømis kundi hvør havt sína kontu her á okkara teldukervi, við øllum

**Stevnumiðini hjá Sjóvinnustýrinum næstu 5 árini eru hesi:**

1. Vera millum 10 teir fremstu flaggstatirnar á hvíta lista hjá Paris MoU
2. Hava fleiri enn 200 skip skrásett í FAS
3. Varða av einum fiski- og handilsskipaflota, hvørs trygdar- og arbeiðsumhvørvi er av teimum bestu í heiminum
4. Kunna veita kappingarførar tænastur, sum í stóran mun byggja á sjálvavgreiðslu umvegis alnetið
5. Hava kundanøgdsemi, ið er omanfyri miðal
6. Vera millum bestu arbeiðspláss í Føroyum, har starvsfólk trívast og mennast við spennandi og avbjóðandi arbeiðsuppgávum

upplýsingum um seg, og har kundi hvør einkultur so syrgt fyri, at øll neyðug skjøl vóru til taks og á tann hátt endurnýggja eitt nú vinnubrøv, uttan at vit her á staðnum skulu hava málið á hondum. Tann einstaki er bestur til at umsita sína egnu sak, tað er mín filosofi.

– *Men er so ikki vandi fyri fleiri mistøkum og verri eftirliti?*

– Nei, tað er akkurát umvent. Nú kunnu somu hendur, sum í dag eru upptiknar av at umsita og geva út hesi skjølini, gera aðrar uppgávur, til dømis eftirlit. Trygdin kemur at liggja í rutinuni, kanst tú siga. Hvør hevði fyri nøkrum árum síðani ímynda sær, at okkara samskifti við bankarnar fór at broytast so nógv, har bankarnir leggja so nógv av arbeiðinum yvir til kundan? Tað krevur eisini álit millum partarnar.

Eg síggi eisini møguleikar við nýggjari tøkni í samband við mynstring. Her eigur at verða møguligt at fáa eina „applikation“ (app), sum sendir mynstirngarlistan talgilt til Sjóvinnustýrið, og at skipanin tryggjar, at tann mynstraði hevur kravda trygdarskeiðið eins og dagførda vinnubrævið, samstundis sum alt hetta hongur saman við minst kravdu trygdarmanning til tað ávísa skipið.

– *Tað verður stundum ført fram, at ov nógv undantøk verða givin av føroysku myndugleikunum. Hvør er tín støða til tað?*

– Har eri eg samdur! Eitt undantak má vera ein fyribilsloysn, sum verður givið meðan tingini verða fingin uppá pláss. Nakrir sigla sum yvirmenn uttan neyðug pappír, og tað mugu vit fáa til lívs.

**–** *Tú ert eisini stavnamaður í Føroysku Altjóða Skipaskránni, FAS. Hvat sært tú í havsbrúnni viðvíkjandi FAS?*

– Eg síggi stórar møguleikar í FAS. Okkara uppgáva er at marknaðarføra FAS og at skapa kontaktir millum útlendsku reiðaríini og føroysku vinnuna, ið arbeiðir í FAS. Vit skulu dagføra føroysku lóggávuna í mun til international krøv, og tryggja, at allar lógir og reglur verða hildnar av skipum, sum eru í FAS skránni.

Vit sum stovnur hava ikki tær stóru inntøkurnar av FAS, men møguleikarnir eru sera stórir hjá tí privatu vinnuni Tað eru fleiri feløg í Føroyum, sum starvast í hesi vinnu, og tað er pláss til munandi fleiri. Øll feløg í FAS skulu verða føroysk og skulu hava umboðsmann her. Útlendsk reiðarí í FAS hava í fleiri førum valt at útlisitera uppgávur til føroysku shippingfeløgini, – higartil serliga tað vit kalla „crew management“ og partar av bókhaldinum, so sum lønarbókhald. Onnur arbeiða innan ISM og skeiðsvirksemi. Talan eru um týðandi uppgávur og virka føroysk shippingfeløg í Føroyum í dag við skrivstovum, sum eru mannaðar við 10-15 starvsfólkum, og einstøk við munandi fleiri, saman við reíðaríum í FAS. Hesi feløg uppbyggja álit og sum tíðin líður – kann væntast – at uppgávur, sum „technical management“, koma at fylla alsamt meiri.

FAS gevur møguleika fyri nýggjari vinnu, har vit sum siglandi tjóð, við vitan um arbeiðið á sjónum hava møguleikar at taka lut í reiðarívirkeminum. Fyri nógv reiðarí í handilsflotanum, í offshore og øðrum er tað sera vanligt at útlisitera uppgávur til onnur at útføra. Tað er her vit sum føroyingar skulu gera okkum galdandi, tí vit hava førleikan. Í dag eru 87 skip í FAS og mál okkara er, at vit skulu hava 100 skip við ársenda. Talið skal økjast og ætlanin er, at vit hava 200 skip í skránni innan 5 ár.

Vit síggja eisini ein part av uppgávuni hjá okkum vera, at sjónliggera hesa nýggju føroysku vinnugrein og harvið fáa fleiri aktørar inn í hesa vinnu.

# Jacob Petur Johannesen



*Jacob Petur Johannesen*

## Føddur 4. august 1963

### Børn:

Eigi trý børn saman við konuni Poulinu Johannesen: Poul Eli 21 ár, Oda Maria 19 ár og Jóhanna 14 ár.

### Starv:

Driftsleiðari hjá IRF, ábyrgd av brennistøðini og spilloljuverkinum.

### Útbúgving:

Mær hevur altíð dámt væl at skrúva og fingist við mekanikk. Lærdi til elektrikara, eftir lærutíðina fór eg í smiðjuna á Skála Skipasmiðju at arbeiða fyri at sleppa inn á Maskinskúla. Tað lá kanska í blóðinum at fara á Maskinmeistaraskúla, tí tað vóru fleiri í familjuni, sum vóru maskinmeistarar. Eisini sá man menningina innan skipabygging viðvíkjandi tøkni og øðrum, sum gjørdi faki áhugavert.

Eg var útlærdur elektrikari 8. september 1984. Og víðkaður Maskinmeistari í januar 1991.

### Hvussu eru útlitini hjá maskinmeistarafakinum:

Útlitini av maskinmeistarafakinum eru góð, og tað kemur at vera meir og meir brúk fyri væl útbúnum maskinmeistarum, tí krøvini til hvønn einstakan maskinmeistara blíva størri og størri orsaka av tí nýggju tøknini, sum kemur fram í dag.

### Hvat er størsta avbjóðingin hjá einum maskinmeistara í dag:

Tað er øll tann nýggja tøknin, sum kemur fram. Tað hevur stóran týdning, at tú tekur við avbjóðingum, at tú fylgir við og ert jaligur.

Samfelagið steðgar ikki upp um tú ikki vilt fornýggja teg.

### Fyrstu ferð til skips:

Í 1979 við nótabátinum Skálafossi.

### Hvørjum skipum hevur tú verið við:

Nótabátinum Skálafossi, trolaranum Skansatanga, Arnasteini, Roc Amadour, Ocean Castel, vaktarskipinum Brimil og frystifarmaskipinum Helenu.

### Longsti túrur til skips:

Mynstraði sum 1. meistari yviri í Harborgrase 8. september 1993. Vit vóru aftur á Oyri 26. februar 1994. Vit fiskaðu rækjur á Flemish Cap og við Eysturgrønland.

### Frítíðarítriv:

Havi eitt festi við 88 áseyðum, so har fer nógv tíð, og so havi eg eisini ein bát.

### Bilur:

Kia Sorente.

### Telda:

Fujitsu fartelda.

### Besta bók:

Fastatøkur hjá Heðin Brú.

### Besti sangur:

Eg sigla man yvir lívsins hav. (Hesin sigur nógv um lívsins viðurskifti).

### Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum:

At tað gongur væl í samfelagnum og mínum nærmastu. Og at rættvísi vinnur í gerandisdegnum. Og at fólk, sum gera ein feil siga frá og standa við tað, tí eingin ger ein feil við vilja.

### Hvat kann øsa teg í dagligdegnum:

Óreiðiligheit, fólk sum eru neilig og fólk, sum ongantíð halda seg hava gjørt nakað skeivt og so fólkafloksmenn.

### Um skiparan og maskinmeistaran

Tað er brúk fyri báðum, men eg haldi maskinmeistarin hevur størri týdning, orsaka av allari tøknini umborð á einum nýmótans skipi í dag.

Maskinistur | Maskinmeistari | Skipari | Skipsførari



# Spennandi og fjølbroyttar útbúgvingar

## og eitt hav av eftirútbúgvingarmøguleikum

**Dømi um skeið:**

1 ARPA skeið
ARPA Automatic Radar Plotting Aids

2 GOC (Generelt og endurnýggjan)
GOC General Operator Certificate (NEW)

3 Tankers Safety serskeið fyri olju-gas- og kemikaliutangakip
Tankers Safety, special course for oil-, gas- and chemical tankers

4 Flutningur av vandamiklum farmi
Transport of dangerous goods in dry cargo ships

5 Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra)
Supplementary training in medical proficiency

6 ECDIS (elektroniskt sjókort)
Course in Elektronic Cart Display Indication System

7 SSO-skeið
Course for Ship Security Officers

8 Fult trygdarskeið fyri sjómenn. STCW A-VI/1-1,A-VI/1-2, A-VI/1-3,A-VI/1-4
Basic safety training

9 Bátaføraraskeið. STCW A-VI/2-1
Proficiensy in Servival Craft and Rescue boats

10 Bridge Resource Management
Bridge Resource Management

*Set teg í samband við skúlan og hoyr nærri.*

Nóatún 7 · FO-100 Tórshavn
Tel 350 250 · Faks 350 251
info@vh.fo · www.vh.fo

**VINNUHÁSKÚLIN**
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Vinnuháskúlin er ein nútímans skúli við serkønum lærarum í øllum lærugreinum, eins og skúlin hevur allar teir hentleikar og útbúnað, sum skulu til fyri at gera útbúgvingina áhugaverda og góða. Útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstyrelsen og IMO.

KREA

## Felagið Línuskip: Hálvdan Gudmundsen

# Vit eiga allir Flemish Cap

**Hálvdan Gudmundsen ivast ikki í, at tað verða allir línubátarnir, og ikki bara Ågot, sum fara á Flemish Cap at fiska**

– Tað er ongin sum helst ivi um, at línubátarnir eiga sín part av søguligu rættindunum á Flemish Cap. So avgjørdur er formaðurin í Felagnum Línuskip, tá Mið & Magn biður hann um eina viðmerking til aktuellu støðuna á Flemish Cap, har landsstýrismaðurin, í skrivandi stund eftir øllum at døma, hevur valt nøkur skip burturúr rúgvuni, teirra millum tað eina línuskipið, til at sleppa á Flemish Cap at fiska.

*Eftir Gunnar Skúvadal*

*– Eitt línuskip er so eftir øllum at døma sloppið uppí part – Ågot sum hevur møguleika at frysta umborð!*

Eg vænti, at tað verða fleiri enn eitt tá avtornar, um landsstýrismaðurin ikki dregur tað ov langt út so eingin hevur tíð at fyrireika seg til at fiska har . Sum eg skilji á honum, so sleppa allir línubátarnir uppí part, sigur Hálvdan Gudmundsen.

Tað hevur verðið fiskað við línu á Flemish Cap og Grand Bank síðani fyrst i fimmtiárunum.

Vit hava sjálvir ein línubát í dag, sum vit keyptu í 2006, tá æt hann Ekliptika. Hann hevur fiskað har og fryst, so tað ber væl til. Toskabann var, men teir fiskaðu alt annað enn tosk. Annars vóru línubátarnir í New Foundlandi til tað varð stongt fyrst í nítiárunum, sigur Hálvdan Gudmundsen, sum hevur sínar tankar um tað, sum higartil hevur verið frammi um ætlanirnar at býta kvotuna á Flemish Cap.

*– Hvat gera tit við trupulleikan, at nógvir av bátunum ikki eru so væl egnaðir til henda fiskiskapin, tí tað er so langt at sigla, og teir fáa ikki fryst umborð?*



Nevndarlimir í felagnum línuskip

Teir sum hava við fiskivinnuna at gera eru sjáldan ráðaleysar, og loysnir finna vit eisini í hesum føri, sigur Hálvdan Gudmundsen.

*– Men tað eru fleiri enn tit, sum gera krav uppá Flemish Cap!*




*Ísfiskalínuskipið Klakkur er bygt á Florø í Noregi í 1960; skipið hevur heimstað í Klaksvík*

– Ja, flakatrolararnir hava eisini mótmælt, og eg skilji teir væl, tá ið man ikki verður nevndur í kunngerðini teir hava hóast alt verðið har og hildið lív í í nógv ár og aðrir bólkir, sum ongantíð hava verðið har fáa rættindini. Men møguliga heldur landsstýrismaðurin, at teir hava nógv annað at fara eftir.

– *Hava tit ikki eisini tað, eitt nú við Íslandskvotuni?*

– Hon kemur væl við hjá okkum um hon ikki er so stór, 5.600 tons harav 1.260 er toskur og skal bítast ímillum u.l. 25 loyvi. Summir hava selt og lagt bátar saman, so tað er ójavnt, hvussu stór loyvi eru hjá hvørjum báti. Og bátarnir fiska u.l. 900 - 1.300 tons uppá ársbasis. Men har er ikki nóg mikið hjá teimum, sigur formaðurin í Línuskipum.

At støðan er hættislig hjá flestu av línuskipunum hevur leingi verið alment kent. Greiningar sum eru gjørdar av roknskapunum hjá skipunum í bólkinum undir einum vísa, at hall hevur eyðmerkt hesa vinnuna seinastu nógvu árini, samstundis sum flotin alsamt er minkaður. Í 2011 hækkaðu fíggjarútreiðslurnar nógv, og úrslitini fyri 2012 benda á, at hesar útreiðslurnar bara halda fram at vaksa. Tað er steinur omaná byrðu, um ikki raksturin batnar heilt munandi tey næstu árini – nakað sum tíverri er torført at finna tekin um beint nú øll londini, sum keypa fisk eru í svárari kreppu.

Bjarni Arnason, grannskoðari, sum í nógv ár hevur gjørt greiningar av úrslitunum hjá ymsu skipabólkunum, er í Norðlýsinum 3.apríl endurgivin fyri at siga, at hóast flestu línuskipini hava íslandskvotu, so sýnist ongin greiður samanhangur at vera millum úrslit og íslandskvotuna tó, at tað er kunnugt, at hesar kvotur vanliga geva eitt munandi íkast til raksturin.

– Tað er greitt, at okkurt munagott skal til fyri at betra um karmarnar hjá hesum skipabólki, sigur Bjarni Arnason, grannskoðari.

Til hetta sigur Hálvdan Gudmundson, formaður í felagnum Línuskip, at grannskoðarin hevur grein í sínum máli. Men heldur eisini, at støðan er tann sama yvir allar skipabólkar, sum fiska á føroyska landgrunninum.

– Línubátarnir krevja nógv fólk, ja kanska dupult so nógv fólk, sum ein trolari á somu støðd. Av tí sama er minni til hvønn mannin nú tað er næstan ongin munur á prísi á línufiski og trolfiski. Hartil hevur tað eisini verðið trupult at manna nøkur línuskip, so tey hava ikki verðið drivin fult út. Vit mugu fáa fríari ræsur til at taka útlendingar umborð í tann mun vit ikki fáa føroyingar, sigur Hálvdan Gudmundsen at enda.

BROT ÚR DAGBÓK



# Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum:

| | | |
|---|---|---|
| 25.01.2013 | MF | Nevndarfundur. Kunna bleiv um tilgongdina í sambandi við LÍV og støðuna í inntøkutrygdini. 8 mál vóru til støðutakan millum annað undantaksloyvir, sáttmálar fyri fiski- og farmaskip, flokkingar hjá SEV, vaktarskipan og svar til Sjóvinnustýrið. |
| 28.01.2013 | MF | Fundur millum Strandferðsluna, MF, FSN og Starvsmannafelagið um nýggjar arbeiðsætlanir við atliti til nýggju hvíldarreglurnar. |
| Vika nr. 5 | | Fundur hvønn dag í viku 5 við ymiskar skipabólkar, har nógv bleiv tosað um olju og gjøgnumskygni. |
| 05.02.2013 | Vinnuhúsið | Óformellur fundur við Reiðarafelagið fyri Farmaskip nú sáttmálarnir ganga út, ætlan bleiv løgd, hvussu víðari skal farast fram. |
| 06.02.2013 | FF | Fundur millum P/F Hvalnes og manningarfeløgini um nýggja avtalu til nýggja Christian í Grótinum. |
| 06.02.2013 | MF | Fundur millum MF, SEV og KAF um umflokkingar, endaði við at semja var um at fara ein kunningartúr á Sundsverkið. |
| 08.02.2013 | Fleiri fundir | Fleiri fundir hendan dagin: Hjá S&K um hoyringsskriv um nýggju pensjónsskipanina. Innleiðandi fundir við Reiðarafelagið fyri Farmaskip um tíðarætlan og framløgu av sáttmálakrøvum, harnæst fundur við partrolarar. |
| 08.02.2013 | FF | Fundur við semingsmenninar, har manningarfeløgini og felagið partrolarar greiddu frá, hví ikki komst víðari við samráðingunum millum partarnar. |
| 11.02.2013 | Vinnuhúsið | Manningarfeløgini og Reiðarafelagið fyri Farmaskip løgdu fram sáttmálakrøv. Seinnapartin sama dag vóru manningarfeløgini umborð á Teistanum og tosaðu um nýggju reglarnar fyri hvíldartíð. |
| 12.02.2013 | Sundsverkið | Eftir innbjóðing frá SEV var MF og KAF á vitjan á verkinum har ein væl upplagdur verkmeistari vísti runt og greiddi frá. Ein sera góður og áhugaverdur túrur. |
| 12.02.2013 | Starvsmannafelagið | Feløgini sum keypa LÍV vóru samlaði fyri at gera viðmerkingar til uppskot til skriv um løgtingslóg um eftirlønarsamansparing. |
| 13.02.2013 | Hotel Hafnia | Semingsfundur byrjaði kl. 9 millum manningarfeløgini og Felagið partrolarar, og eftir 12 tímum á Hafnia vórðu partarnir samdir um eina semju. |
| 15.02.2013 | Smyril | Fundur umborð á Smyril millum manningarfeløgini og manningina um nýggju hvíldarreglurnar. Av Smyrli varð farið á fund millum manningarfeløgini og felagið lemmatrolarar. Tíð var eisini til at heilsa uppá nýggja stjóran í LÍV. |
| 19.02.2013 | FF | Sáttmálasamráðingar millum manningarfeløgini og felagið Lemmatrolarar. Samráðingarnar endaðu við, at sáttmáli bleiv undirskrivaður; hann fylgir avtalunum, sum vóru gjørdar við hinar bólkarnar. |
| 20.02.2013 | Vinnuhúsið | Framhald av sáttmálasamráðingunum við Reiðarafelagið fyri farmaskip. |

| | | |
|---|---|---|
| 21.02.2012 | **FF** | Sáttmáli undirskrivaður við rækjuskip, hesin fylgir tí lagda leistinum. |
| 27.02.2012 | **MF** | Nevndarfundur: Kunnað bleiv um skipið „Saga“, sum FMU hevur tikið arrest í, og sum liggur á Skálafjørðinum eisini bleiv greitt frá sáttmálasamráðingunum, sum eru í gongd. Fleiri mál til støðutakan, teirra millum maskinmeistarar uttan vinnubræv, manglandi svar frá Sjóvinnustýrinum, SEV flokkingar og gerðarættarmál. |
| 27.02.2012 | **MF** | Framhald av fundi millum manningarfeløgini og Strandferðsluna um hvíldarreglur. Lønardeildin luttók eisini á hesum fundi, so møguliga fingu vit ein nýggjan inngangs- vinkul til málið. |
| 05-03-2013: | **Vinnuhúsið** | Framhald av sáttmálasamráðingunum við Reiðarafelagið fyri farmaskip. |
| 05.03.2013 | **MF** | Fundur millum Strandferðsluna og manningarfeløgini um hvíldarreglur, umboð fyri lønardeildina luttóku eisini á hesum fundi. Manningarfeløgini blivu samd um at geva frávik frá hvíldarreglunum til Teistan og Ternuna; tað snýr seg partvís um 3 og 6 tímar. |
| 08.03.2013 | **Vinnuhúsið** | Framhald av sáttmálasamráðingunum við Reiðarafelagið fyri farmaskip. Semja var um, at samráðingarnar skuldu vera í einum minni bólki, og bleiv sáttmálin samstundis framlongdur til 1. mai. |
| 08.03.2013 | **MF** | Fundur millum nevndina og maskinmeistararnar á Sundsverkinum um møguleikarnar fyri umflokkingum. |
| 15.03.2013 | **FSN** | Blaðfundur nr. 63: Fíggjarstøðan var til viðgerðar og upplagið eisini. Avgerð varð eisini tikin til komandi blaðgreinir. |
| 15.03.2013 | **Vinnuhúsið** | Framhald av sáttmálasamráðingum við Reiðarafelagið fyri farmaskip |
| 18.03.2013 | **Bøgøta** | Trygdargrunnur Fiskivinnurnar. Ársfrásøgn fyri 2012 og innanhýsis ársroknskapur fyri 2012 blivu framlagdir og viðgjørdir. Samstundis varð fíggjarætlan fyri 2013 framløgd. |
| 19.03.2013 | **FF og Smyril** | Fundur umborð á Smyrli um reglurnar um hvíldartíð. Seinri fundur á skrivstovuni hjá FF um framhaldandi fund við teir bólkar, sum vit mangla avtalur við. |
| 21.03.2013 | **Suðuroyar túrur** | Fundur umborð á Smyrli meðan skipið bunkraði í Vági.<br>Fundurin var millum leiðsluna hjá SSL og Maskinmeistarafelagið saman við maskinstjóra og álitismanni umborð; fundurin snúði seg um hvílitíð. Ein sera góður fundur, har høvi var hjá umboðunum at tosa saman umborð. |
| 22.03.2013 | **MF** | Nevndarfundur, síðsti fundur áðrenn aðalfundin. Gjøgnumgongd av roknskapinum og undirskrivan.<br>Tosað bleiv eisini um hvíldarreglur, sáttmálasamráðingar og fund, sum hevði verið á Sundsverkinum. |
| 26.03.2012 | **MF** | Fundur á skrivstovuni hjá Páll Nielsen um mál vit hava í fasta gerðarrættinum; umframt onnur mál. |
| 27.03.2013 | **FF** | Fundur í hølinum hjá FF á Bryggjubakka við Felagið Nótaskip. Fyrsti fundur um nýggjan sáttmála, eisini bleiv tosað um sáttmála fyri nýggja Christian í Grótinum. Høvi var eisini at heilsa uppá nýggja stjóran hjá Føroya Reiðarafelag. |
| 04.03.2013 | **Vinnuhúsið** | Framhald av sáttmálasamráðingunum við Reiðarafelagið fyri farmaskip. Á hesum fundinum varð serliga tosað um skip í frálandavinnuni. Seinnapartin hendan dagin varð nevndarfundur hjá MF. Fleiri mál vóru á skránni m.a. hvíldartíð hjá strandferðsluskipunum. Útbúgvingarráð valt til Vinnuháskúlan og býti av málsøkjum. |



# Tíðindi frá Skipara- og Navigatør-felagnum:

| | |
|---|---|
| 05.02.2013 | **Vinnuhúsið (RFF)** |
| | Samráðingar byrja um nýggjan sáttmála við Reiðarafelagið Fyri Farmaskip (RFF) |
| 06.02. 2013 | **Fiskimannafelagið (FF)** |
| | Sáttmálasamráðingar við Felagið Nótaskip (FN) |
| 07.02.2013 | **MF (RFF)** |
| | Manningarfeløgini hittast til at samskipa sáttmálakrøvini fyri farma- og frálandaskip. |
| 11.02.2013 | **Vinnuhúsið (RFF)** |
| | Partarnir leggja sáttmálakrøvini fram og avtala, hvussu samráðingarnar skulu fara fram víðari. |
| 12.02.2013 | **Fiskimannafelagið** |
| | Manningarfeløgini hitta semingsmenninar og greiða frá ósemjuni við Felagið Trolskip. |
| 13.02.2013 | **Hafnia** |
| | Semingsroynd við Trolskip. Tá komið var út á kvøldið góðtóku báðir partar eitt semingsuppskot. |
| 14.02.2013 | **Kappingarráðið** |
| | Sáttmálin verður undirskrivaður við Felagið Trolskip. |
| 19.02.2013 | **FF** |
| | Samráðingar við Lemmatrolarar |
| 1902.2013 | **Vinnuhúsið (RFF)** |
| | Staðfest verður, at partarnir standa langt frá hvørjum øðrum. Grundleggjandi ósemja er um føroyski lønarkarmurin skal verða grundarlagið fyri einari lønarhækkan. |
| 21.02.2013 | **FF** |
| | Fundur við Rækjuskipini, sáttmáli verður gjørdur. |
| 21.02.2013 | **FSN** |
| | Fundur við Jónas Sigmarson frá Nor-Lines, m.a varð avtala at FSN skal verða við til næstu officers kongress hjá reiðarínum. Tørvur er á, at yvirmenn fáa meira kunning um hvussu altjóða arbeiðsmarknaðuri virkar innan sjóvinnu. |
| 25.02.2013 | **FF** |
| | Semja verður gjørd við Garnaskip |
| 26.02.2013 | **ALS** |
| | Stýrisfundurin samtykkir at seta Magna Olsen í starv sum stjóra, hann hevur verið fíggjarleiðari hjá ALS. Fíggjarætlan fyri 2013 verður samtykt. Eyðstein Djurhuus atkvøddi ímóti, tí partur av útreiðslunum eru ikki heimilaðar í ALS lógini. Ósemja er í stýrinum um hetta mál. |
| 27.02.2013 | **MF** |
| | Fundur við Strandferðsluna og Lønardeildina, avtala varð gjørd um frávik í hvíldarreglum sambært hvílitíðarkunngerðini fyri Ternuna og Teistan |
| 05.03.2013 | **Vinnunevndin** |
| | Manningarfeløgini verða hoyrd um lógaruppskot frá andstøðuni, sum hevur til endamáls at tryggja, at sáttmálarnir verða yvirhildnir í fiskiskipaflotanum. |
| 05.03.2013 | **Vinnuhúsið** |
| | Samráðingarnar halda áfram. |
| 11.03.2013 | **FSN** |
| | NEMA vísir okkum eina skipan til samskipan av málsgongd og málsviðgerð. |
| 18.03.2013 | **Heygum og Petersen adv.** |
| | Trygdargrunnurin hevur stýrisfund, roknskapurin fyri 2012 vísir eitt avlop á 12 mill. Eginognin er nú 70 mill. Á næsta fundi skal støða takast til hækkingar í útgjaldinum . |
| 19.03.2013 | **FF** |
| | Manningarfeløgini hitta reiðarí hjá Næraberg, til at viðgera ymiskar spurningar í sambandi við avrokningar m. a. flutningsútreiðslur. |

| | | |
|---|---|---|
| 04.04.2013 | **Vinnuhúsið** | |
| | Sáttmálasamráðingar | |
| 05.04.2013 | **ALS** | |
| | Stýrið viðgerð roknskapin fyri 2012 og hvussu raksturin kann fáast í javnvág. Halli var uml 80 mill í fjør og sambært framrokningum verður á sama støði í ár. Við verandi gongd er kassin tómur í 2016. | |
| 05.04.2013 | **Fiskimálaráðið** | |
| | Fiskivinnuráðið viðgerð uppskot um kunngerð um kvotuna á Flemish Cap, og frítøku av kravi um uppboðssølu fyri botnfisk veiddan undir Føroyum. Annfinn Garðalíð umboðaði okkum í ráðnum. | |
| 09.04.2013 | **Vinnuhúsið** | |
| | Eftir nógvar fundir byrjar nú at nærkast einari niðurstøðu, um samráðingarnar koma at bera á mál. | |
| 12.04.2013 | **ALS** | |
| | Trygdargrunnurin viðgerð broytingar í útgjaldi og avreiðingarkrav fyri minstaforvinningi. | |

# Nú er eisini kríggj um sildina

Nú um dagarnar kom fram, at fiskimálaráðharrin hevur ásett okkum eina eginkvotu av sild á meir enn 100 tús. tons. Talan er um eina tvífalding í mun til tað, sum vit kundu fingið í strandalandaavtaluni

Føroyar hava nú ásett sær sjálvum bæði makrel og sildakvotu. Hinir partarnir eru sum vera man á gosi, og skuldseta okkum fyri ránsveiðu. Tað er torført at síggja nakra skjóta loysn í hesi ósemju, stóri spurningurin er um Føroyar eru í fer við at avbyrgja seg í Norðuratlanshavinum.

ES og Noreg hava fyrr hótt við ymiskum revsitiltøkum, men higartil er tað bert blivið til eitt landingabann fyri føroysk uppsjóvarskip. Nú sildin eisini er partur av ósemjuni kann væl hugsast, at ES og Noreg fara at sláa hart niður á okkum á fleiri økjum. Teir hava fyrr nevnt at FAS skrásett skip skulu avmarkast í vinnumøguleikum í teirra sjóøki. Hetta kann gerast ein vanlukka fyri okkara spírandi frálandavinnu og farmaskipaflota.

Einki er at ivast í at Vestergaard spælir høgt spæl, tá hann á hendan hátt roynir at verja okkara rætt at veiða tann fisk, sum er í okkara egna sjóøki. FSN tekur fult undir við hesum sjónarmiðum.

Í hesum maktkampi við risarnar fyri eystan og sunnan, mugu vit ikki gloyma, at vit bert eru ein pinkutjóð, sum ikki eingang hevur fult ræði í egnum landi. Um hendan konfliktin heldur á at herðist uttan nøkur útlit til semju ella linna, so man Danmørkin nokk fara at seta heimastýrið uppá pláss.

Vónandi hava okkara myndugleikar tikið hetta við í sína strategisku handlingsplan. Vit sum arbeiða í fakfeløgum kenna alt til at upptrappa konfliktir. Tað er eisini neyðugt at hava eina ætlan fyri, hvussu vit koma burtur úr ósemjuni við skinninum á nøsini.

# Farma- og frálandasáttmálin vorðin eitt slag av minstuløn

Sáttmálin við Reiðarafelagið fyri Farmaskip (RFF) er uppsagdur til at fara úr gildi 1. mars 2013. Partarnir hava verið til samráðingar, fyribils er gamli sáttmálin longdur til 1. mai.

Manningarfeløgini samráðast øll saman; hetta hevur verið gjørt seinastu árini. Feløgini hava tó hvør sín egna sáttmála, og nakað av muni er, hvussu sáttmálin er orðaður.

## Okkara krøv

Manningarfeløgini hava kravt eina munandi lønarhækkan. Hetta grunda vit á, at flestu sjómenn fáa væl meir enn sáttmálaløn við at gera egna avtalu við reiðaran. Hesin munurin hevur gjørt, at nógvir sjómenn frávelja limaskap í fakfelag. Hesir hugsa, hví skulu vit vera limir í einum felag um vit sjálvir mugu samráðast um eina hóskandi hýru. Feløgini mugu partvíst geva monnunum rætt í hesum sjónarmiði. Um feløgini ikki megna at lyfta sáttmálan upp, so hann nærkast veruliga lønarlagnum, so er tilverurætturin hjá feløgunum hóttur.

Vit hava eisini kravt, at limir hjá okkum, sum hava egna lønaravtalu skulu hava rætt til at ráðføra seg við felagið um avtaluna. Eisini hava vit kravt, at hesar avtalur skulu dagførast í minsta lagi einaferð um árið.

## Krøvini frá RFF

Reiðararnir hava eisini sett nøkur krøv fram, flestu krøvini hava til endamáls at javnstilla teir ymisku sáttmálarnar. FSN sáttmálin er í ávísum førum betri enn hinir sáttmálarnir, serliga í samband við uppsøgn og útgjald av uppspardari frítíð. RFF hevur eitt ynski um, at treytirnar í sjómanslógini skal verða útgangsstøði í setanar- og uppsagnartreytum.

## Karmurin er snávingarsteinurin

RFF er limur í Vinnuhúsinum, sum stýrir øllum samráðingum á privata arbeiðsmarknaðinum, tó undantikið fiskiflotan. Vinnuhúsið heldur sera fast uppá, at allur arbeiðsmarknaðurin skal hava sama lønarkarm ella prosentvísa lønarhækking.

Seinastu árini hevur hesin karmur ligið millum 1-2 % um árið og sáttmálarnir, sum eru gjørdir fyri næstu tvey árini eru á hesum støði. FAS skip eru í beinleiðis kapping við DIS og NOR/NIS um skikkaðar sjómenn. Lønarvøksturin í Noregi er um 4-5 % um ári. Í Danmark hevur vøksturin ligið um 3-4%, men er lækkaður niður á 2 % í seinastuni. Føroyskir sjómenn hava tískil upplivað, at munurin millum føroyska lønarlagið og lønarlagið í grannalondunum er vaksið í stórum seinastu árini.

Fyri at fasthalda manningarnar mugu reiðarar nú gjalda munandi meir enn sáttmálalønina. Hjá FSN eru tað bert einstakir limir, sum bert fáa sáttmálalønina. Ein uppteljing av øllum okkara 170 limum í FAS vísir, at í meðal fáa hesir 15 % meir enn sáttmálin sigur. Tað er serliga fyri skiparar í frálandavinnu, at munurin er størstur.

## Ásanna problemið

Undir samráðingunum hevur RFF partvíst ásanna, at vit hava eitt problem. Men teir siga, at tað hevur týdning fyri reiðarar, at eitt ávíst spælirúm er millum sáttmálan og ta løn, sum teir eru sinnaðir at gjalda. Partarnir tosa nú saman um, hvat kann gerast við problemið. RFF vil hava, at lønarkarmurin, sum útgangsstøði skal galda, men vilja gera strukturellar broytingar í lønartalvu, sum bøta um problemið. Manningarfeløgini hava havt fleiri uppskot um, hvussu strukturin í lønarskipanini kann broytast so, at vit røkka okkara endamáli. Ein minni arbeiðsbólkur hevur arbeitt við fleiri møguligum uppskotum.

## Eitt øðrvísi sáttmálakrav

Hesaferð hava vit kravt, at reiðarar skulu gjalda eitt avgjald til fakfeløgini fyri at brúka sáttmálan. Hetta skal tryggja, at feløgini eisini fáa inntøkur fyri teir, sum ikki vilja vera limir, men sum allíkavæl fáa gagn av tí kollektiva sáttmálanum. Føroyskir reiðarar gjalda longu sum nú er, avgjald til útlendsk fakfeløg fyri útlendingar við FAS skipum. Tí skuldi einki verið í vegin fyri at goldið fyri føroyingar eisini. Um hendan skipan vinnur frama, so fara manningarfeløgini at lækka limagjaldið samsvarandi.

# Føðingardagar

## Skipara- og Navigatørfelagið

| | | |
|---|---|---|
| Sigfríður Joensen | 01.04.1943 | 70 ár |
| Jógvan P. Johansen | 14.04.1943 | 70 ár |
| Sjúrður Eliasen | 25.04.1943 | 70 ár |
| Eyðfinnur Jóannes Jacobsen | 07.05.1943 | 70 ár |
| Hans Pauli í Horni | 09.05.1943 | 70 ár |
| Jóhan Christiansen | 16.05.1943 | 70 ár |
| Martin Vágsheyg | 11.04.1953 | 60 ár |
| Petur Pauli Poulsen | 03.05.1953 | 60 ár |
| Alfred Eliasen | 04.06.1953 | 60 ár |
| Árni Otto Hansen | 22.06.1953 | 60 ár |
| Poul Holm Jacobsen | 03.04.1963 | 50 ár |
| Thormann Niclasen | 18.05.1963 | 50 ár |
| Magni Rasmussen | 01.06.1963 | 50 ár |
| Hans Andreas Thomassen | 09.06.1963 | 50 ár |
| Tummas Jacobsen | 25.06.1963 | 50 ár |
| Sámal (y) Jacobsen | 29.06.1963 | 50 ár |
| John Midjord | 11.04.1973 | 40 ár |
| Hanus Poulsen | 11.04.1973 | 40 ár |
| Annfinn T. Fagraklett | 19.04.1973 | 40 ár |
| John Frits á Løgmansbø | 19.04.1973 | 40 ár |
| Fróði Rubeksen | 02.05.1973 | 40 ár |
| Helgi Luid Solmunde | 17.05.1973 | 40 ár |
| Karl Martin Justesen | 26.05.1973 | 40 ár |
| Fróði Sørensen | 01.06.1973 | 40 ár |
| Arnfinn Jacobsen | 10.06.1973 | 40 ár |

## Maskinmeistara-felagið

| | | |
|---|---|---|
| Sverri Køtlum | 12.06.1943 | 70 ár |
| Karl Ólavur í Trøðini | 04.14.1953 | 60 ár |
| Poul Johan í Stovuni | 05.12.1953 | 60 ár |
| Niels Th. Pedersen | 05.13.1953 | 60 ár |
| Jógvan Andreasen | 06.29.1953 | 60 ár |
| Conrad Gaard Joensen | 04.02.1963 | 50 ár |
| John Hansen | 05.15.1963 | 50 ár |
| Hans Pauli Olsen | 06.13.1963 | 50 ár |
| Eyðbjørn Fridal Petersen | 06.21.1963 | 50 ár |
| Sigurd Jan Tavsen | 06.27.1963 | 50 ár |
| Guttorm Sundstein Joensen | 04.22.1973 | 40 ár |
| Ásmundur Sivertsen | 04.26.1973 | 40 ár |
| Jens Mørkøre | 04.27.1973 | 40 ár |

## Dánjal Jákup Meinertsson:

# Felagsskapurin ANTARES

Vit hava hitt Dánjal Jákup Meinertsson, sum er formaður í felagsskapinum Antares. Hann er uppvaksin í Klaksvík, og er búsitandi á Norðoyri, og hevur drúgvar royndir á sjónum. Í løtuni er hann 1. meistari á einum skipi, sum nevnist North Sea Giant. Talan er um eitt sermerkt skip, sum er bygt til arbeiðsuppgávur, sum skulu gerast á botni í oljuøkjum. Talan kann t.d. vera um instalatiónir, sum skulu leggjast á havbotnin og um kaðalarbeiði.



*Dánjal Jákuo Meineretsson*

– Dánjal Jákup greiðir okkum frá, at teir í løtuni arbeiða í norskum sjógvi, men innímillum gera teir onkran avstingara inn í bretskt øki. Reiðaríið, sum eigur North Sea Giant eitur North Sea Shipping. Tað er eitt lítið familjureiðarí, sum flytur seg frá vanligari fiskivinnu til frálandavinnu. Teir fáast enn við fiskivinnu, men nú er offshore ein størri partur. Teir hava gjørt nógv við at keypa skip, og so selja tey, tá eitt gott boð er komið. Soleiðis hava teir styrkt seg. Nú eru teir byrjaðir at vaksa um flotan.

North Sea Giant er einasta skipið teir eiga fult út sjálvir, men teir hava eitt, sum stendur í gerð, og ognarpartar og management á onkrum skipum. Teir eiga soleiðis helmingin av Atlantic Guardian, sum eisini hevur gjørt uppgávur fyri EMGS inni á føroyskum øki greiðir Dánjal Jákup okkum frá.

### Fiskimaður, handverkari og maskinmeistari

Vit hava hug at siga, at tá man er 1. meistari á einum serútgjørdum skipi, so má nógv vera lært frammanundan. Vit spyrja tí hvør leiðin hevur verið?

– Eg fór í handverkslæru í 1981, og var útlærdur lastbilmekanikari í 1985; og fór á maskinskúla í 1993. Eg varð útlærdur maskinmeistari í 1995.

Tá eg var liðugur í 1995, fór eg við onkrum snellubáti; tað var fyri at fáa siglingstíð.

Harumframt havi eg eina bachelorútbúgving í leiðslu frá Robert Gordon University í Aberdeen.

### Hvat er tað sum dregur

Vit vita, at eitt sera stórt tal av føringum nú arbeiða í oljuvinnuni, á pallum og umborð á skipum, sum eru í oljuvinnu. Tí spyrja vit, hvat tað er, sum dregur mest til slík størv ?

– Tað er onki at ivast í, at góða lønin hevur stóran týdning, men arbeiðið verður eisini hildið at vera

## Um felagið Antares

Felagið Antares varð sett á stovn 5. Juni 2004.
Endamál felagsins er at:

- virka fyri at nøra um samstarv og samanhald í millum limirnar, og ímillum familjur teirra.
- eftir førimuni at verða teimum limum til hjálpar, sum á ein ella annan hátt koma illa fyri.
- eftir førimuni at veita limum ráð og vegleiðing um skattaviðurskifti, pensjónsviðurskifti o.a.
- skipa fyri fyrilestrum og á annan hátt savna inn vitan til limirnar.
- skipa fyri tiltøkum so sum útferðum, bowling, veitslum og annað, sum kann nøra um samanhaldið.
- at samanseta og senda út tíðindi til skip og bátar.

## 480 limir

Felagið hevur í dag 480 limir. Antares er ein felagsskapur í stórum vøkstri.
Seinasta árið hevur felagið fingið 240 nýggjar limir.
Tað árliga limagjaldið er 400,- kr. Lesandi gjalda bara 50,- kr. um árið.
Heimasíðan hjá felagnum er at finna á: www.antares.fo

## Nevndarlimir

Dánjal Jákup Meinertsson, formaður
Karlot Heirgarsson, næstformaður
Herluf Vang, kassameistari
Bárður Laksáfoss, kassameistari 2
Martin Sonny Frederiksen, skrivari, røkil og fyriskipari
Magni Skaale, skrivari 2
Jónhard Petersen, nevndarlimur
Bjarki Fjørdal, nevndarlimur

## Morgunmatur og Kaffimik

Ein fastur táttur í felagsskapinum er, at teir limir, sum staddir eru heima hittast fríggjamorgun; tiltakið nevna teir „Morgunmatur og Kaffemik".

Vanliga verður møtt kl. 9 á hesum støðum: Svimjihøllin á Hálsi í Havn, hjá Jórun í Klaksvík og á Pubbuni á Tvøroyri.

Sama „tiltakið" er kl. 10 er í Effo-støðini í Sørvági og Effo-støðini í Skálabotni.



*Limir samlaðir til morgunmat og kaffemik*

rættiliga spennandi. Serliga við skipum sum North Sea Giant, har nógvar rættiliga áhugaverdar uppgávur eru at loysa, greiðir Dánjal Jákup frá.

Vit uppliva eisini spennandi støð ymsastaðni í heiminum, og sjófólk hava ein serligan felagsskap. Og so er tað eisini lokkandi at hava frí helvtina av árinum, vit eru 4 vikur úti og 4 vikur heima.

## Drúgvar royndir á sjónum

Vit skilja á lagnum, at Dánjal Jákup hevur verið nógv á sjónum. Vit spyrja tí nær hann fór fyrsta túrin. Hann greiðir nú frá, at tað var í 1976 við línubátinum Gerðhamar. Vit vóru í Íslandi við svartkalvalínu.

Dánjal Jákup hevur eisini verið ein svartkalvatúr við Labrador við Borgaranum í 1977 og so Pison beint aftaná. Og í 1979 og 1980 var hann messudrongur á Smyrli í uttanlandasigling.

Í 1996 var hann ein túr við einum russiskum trolara, Timofey Zhelyapukin, til ísfisk í Barentshavinum, og so eitt skifti við djúpvatnstrolaranum Sancy úr Vági.

## Venezuela, fjar- og miðeystur

Og Dánjal Jákup greiðir víðari frá: Í 1997 fór eg við seismikkskipinum Western Horizon hjá Western Geophysical, og seinni við Western Legend. Tað var fyrst í Fjareystri, síðan í Miðeystri og við Vesturafrika. Tá eg gavst við Western Legend í 2001 arbeiddu vit í Venezuela.

Eg var síðan 7 ár á Trygdarmiðstøðini til eg í 2008 fór til Mexico við Arbol Grande hjá North Sea Shipping. Eftir nýggjár 2009 fór eg til Vigo í Spania eftir nýggjum skipi, North Ocean. Har var eg til vit fóru aftur til Vigo eftir North Sea Giant í januar 2011; og har eri eg framvegis.



Vaktarskipið Havila Troll í ringum veðrið. Havila Troll er 93 m langt og 18 m breitt, og hevur alla hugsandi tilbúgvingarútgerð



Venjing við tyrlu

# Lívið umborð

Ragnar Mouritsen, yvirstýrimaður á Oseberg Feltcenter sigur frá

Ragnar greiðir frá, at eins og tyrlumanningin her heima javnan hevur venjing, so er eisini í Norðsjónum. Venjingarnar vera altíð tiknar í størsta álvara og umframt, at manningar hava venjingar umborð, so hava tyrlumanningin og skip ofta felags venjing. Tað eru fleiri fyrimunir við felags venjingum, og serliga er tað gott hjá tyrlumanningini at koma at kenna skipið – hvar tað er best at seta fólk niður, hvar ymiskir vandar eru osv.

## Oseberg Feltsenter

Oseberg Feltsenter hevur eina tyrlu við manning umborð. Hendan tyrlan hevur ábyrgd av Oseberg og Troll feltinum. Hesi oljufelt liggja vestur úr Bergen. Bæði feltini fáa allar vøru frá Mongstad, ið liggur norðanfyri Bergen. Føroyingar eru væl kendir við Mongstad, og í eina tíð silgdi Eldborg hjá Skansi Offshore út frá Mongstad. Eisini kann nevnast at NOFO, ið hevur tilbúgving, um nakar oljuleki skuldi verið, hevur høvuðsdeild har. Øll veitingarskip. ið sigla í Norðsjónum eru partur av hesi tilbúgving, og hava eisini javnan venjing við oljusperring og upprudding.

Í Oseberg Feltsenter eru 3 platformar. Oseberg A, Oseberg B og Oseberg D. Á platformunum arbeiða uml. 320 fólk.

Olja og gass verða reinsað har, áðrenn tað verður sent víðari til Heimdal, og har frá niður til Onglands, Holland og onnur norðurevropeisk lond.

## Venjing saman við tyrlumanning

Til hvørt oljufelt er eitt vaktarskip, ið hevur serliga NOFO útgerð umborð, og góðar umstøður, um onkur vanlukka skuldi hent. Eitt av vaktarskipunum er Havila Troll, ið sæst á myndini í ringum veðri. Hesi skip liggja úti alt árið, og koma bert inn at skifta manning.

Vanligt er at hesi skip hava regluliga venjing saman við tyrlum. Onkuntíð verða fólk tikin upp úr sjónum, og aðrar tíðir verða dukkur blakaðar á sjógv, sum tyrlan sjálv skal finna uttan hjálp frá skipi. Eisini eru sokallaðar hoist-venjingar, har lækni, børa og neyðagregat verða hoistað niður á skipið. Onkuntíð er best at brúka afturdekkið til tað,



Oseberg Feltsenter í ringum veðrið





Venjing við tyrlu



Venjing við tyrlu



Venjing við tyrlu

ella bakkan, alt eftir umstøðunum. Hetta er ein umráðandi partur, tí tyrlumanningin kemur at kenna skipið og tess fyrimunir og vansar. Hetta er eisini vanligt um okkara leiðir, har eisini tyrlumanningin hjá Atlantic Helicopters ger tað sama.

Á myndunum sæst venjing í góðum veðri, men tað kemur meir enn so fyri, at venjingar verða hildnar í náttarmyrkri og í ringum veðri. Undir verri umstøðum verður sjálvandi hædd tikið fyri vandunum, men ofta eru tær mest gevandi venjingarnar undan vánaligum líkindum.

## Onkur flott…

Fleiri av teimum størru skipunum, serliga kranaskip, hava øll tyrlupall umborð. So skjótt eitt skip kemur á eitt av oljufeltunum, kemur tyrlan vanliga á vitjan, tá hetta verður gjørt fyri at læknin á tyrluni kann koma at kenna umstøðurnar umborð. Øll størri skip hava góða sjúkrastovu umborð, og tí er gott hjá læknanum at kenna sjúkrastovuna, at vita hvat fyri heilivágur er, og hvar hann liggur osv. Eisini hava tey størru skipini egna sjúkrasystur umborð, og tá er gott at lækni og sjúkrasystur koma at kennast undir vanligum umstøðum.



Ragnar Mouritsen stendur frammanfyri bjargingartyrluni á Oseberg- og Troll feltinum.



Oseberg Feltsenter

# Heimurin liggur nú opin

Eftir: Gestur Hovgaard

Hagstova Føroya visti 19. februar í ár at siga, at í 2011 forvunnu føroyingar í vinnu uttanlands 850 milliónir krónur. Hetta svarar til 11% av øllum lønum í Føroyum og 6,5 % av bruttotjóðarinntøkuni (BTI). Við hesum eru Føroyar tað landið í Evropa, sum meiri enn nakað annað, livir av inntøkum vunnar uttanlands. Líka áhugavert er, at talan er um stóran vøkstur av fólki í frálandavinnu. Ein vøkstur, ið hevur staðið við síðani 2004. (*Sí mynd 1 niðanfyri*).

Eg skal í hesi greinini royna at seta eina samfelagsliga diagnosu á hesi tølini! Og har vági eg pástandin, at hendan gongdin er dømi um, at ein samfelagslig kollvelting er í ferð við at henda. Kappingin um arbeiðsmegi er vorðin global, og tað at hava Føroyar sum sína nátúrligu basu, er eisini ein kapping um, hvat „tað heimliga" skal vera.

## Gongdin heldur áfram

Verandi gongd við øking av fólki í vinnu uttanlands, fer mest sannlíkt at halda áfram nakað enn. Tey feløg, ið varða av áhugamálunum hjá fólkum í starvi uttanlands, síggja enn eina øking í teirra limatali. Í fleiri londum kring okkum eru eisini vinnur, har eftirspurningurin eftir væl skikkaðum arbeiðsfólki økist, ikki minst innan sjóvinnu og handverk. Og vit síggja her heima, at tær útbúgvingar, eftirspurningur er eftir í t.d. frálandavinnuni, eisini eru tær, ið nógvir ungir menn søkja inn á. Eitt nú til elektrikara, maskinmeistara og skipsførara. Alment ber til at siga, at dreingir í størri mun søkja handverk og gentur søkja bókliga vegin, soleiðis sum mynd 2 eisini vísir. (*Sí mynd 2 á næstu síðu*).

**Lønarflytingar millum Føroyar og útlond í mió. kr.**




Mynd 1. Kelda: Hagstovan




*Mynd 2: Val millum bókliga og handverksliga útbúgvingarleið, gentur og dreingir, 2004, 2008 og 2011.*

## Er gongdin góð ella ring?

Um tað at 11% av lønunum í Føroyum verða tjentar aðrastaðni er ringt ella gott, er tað ikki nakað eintýðugt svar uppá.

Fyri tann einstaka er oftast talan um góðan vinning, tí lønin uttanlands er oftani væl betri, enn bjóðað verður í Føroyum. Søguliga vita vit eisini, at arbeiðsmøguleikar aðrastaðni hava gjørt, at mangir føroyingar hava havt eitt livibreyð, tá kreppurnar hava herjað her á landi. Samfelagsbúskaparliga er eisini gott, at fremmandur valuti verður vunnin til landið. Tað er væl kent frá øðrum smærri oyggjasamfeløgum, ið hava smáar og sera opnar marknaðir, at tey eru sera bundin at inntøkum vunnar aðrastaðni. Tað verður enntá pástaðið, at hetta er ein grundleggjandi fortreyt við at vera eitt smásamfelag, og tí nakað man má læra seg at liva við.

Sjálvur halli eg tó til, at síggja hesa støðuna sum ein álvarsligan strukturvansa í heimligari vinnu og vinnupolitikki. Vansin er, at okkara egna vinna í so lítlan mun megnar at skapa eitt áhugavert umhvørvi at virka í. Betri var sjálvandi, um fremmandi valutin í nógv størri mun varð vunnin við, at vørur og tænastur vóru framleiddar her á landi. Eitt høgt tal av uttanlandsarbeiði eigur í besta lagi at vera eitt slag av stutttíðar kreppuloysn.

Støðan er hættislig, tí sera nógv fólk í arbeiðsførum aldri hava valt at flyta, ikki bara vegna væntandi útbúgvingarmøguleikar, men eisini fólk sum eru í vinnu, og í prinsippinum eins væl kundu búð her. Her spæla løn, skattur og arbeiðsmøguleikar sjálvandi inn, men nútíðar valið av starvi, bústaði, parlagi v.m. má síggjast í einum breiðari høpi.

## Hvat fyri kollvelting er talan um?

Tann samfelagsliga kollveltingin, ið fer fram, kann lýsast við sokallaðu globaliseringini. Globalisering merkir, at alt flytur seg og umskapast við nógv størri ferð enn nakrantíð áður, og brýtur tí niður teir strukturar, sum vanliga hava fingið samfelagið at hanga saman. Verandi mørk, t.e. landamørk, sosial mørk og mentunarlig mørk, verða flutt, niðurbrotin og endurskapað í nýggjum líki.

Samfelagið hevur verið grundað á, at menniskjað er knýtt at ávísum staði og hevur eina ávísa fastlagda ella viðfødda mentan. Tað nýggja og kollveltandi er, at vit mugu venja okkum við, at samfelagið í dag er grundað

á mobilitet. Hesin nýggi globali mobilitetur merkir, at heldur enn binding at ávísum staði ella mentan, so velja fólk, hóast sama útgangsstøði – t.e. sum systkin, sum bygdafólk v.m. – ógvuliga ymiskt og skiftandi: tey flyta fleiri ferðir gjøgnum lívið, tey skifta arbeiði oftani, tey raðfesta útbúgving høgt, men ymiskt, og tí taka tey til sín skiftandi og ymiskar mentanir. Hetta er tað, vit eisini kalla individualisering og slær serliga ígjøgnum í mun til útbúgving og arbeiðsmarknað.

Útisiglarin hevur altíð grundað sína tilveru á at vera flytførur, og júst møguleikin við at sigla úti, hevur verið við til at tryggja, at tað hevur verið møguligt at uppihalda sær og sínum í Føroyum. Hóast hetta, kunnu vit siga, at eisini her er nakað broytt. Taka vit ein útisiglara fyri bara 20-30 árum síðani, so fann hann sær allarhelst konu í nærumhvørvinum, og har búsettust tey. Hann sigldi og vann peningin, meðan konan var heimagangandi, ansaði børnum, húsi og helst seyði eisini.

Í dag ger útisiglarin sjálvsagt tað sama, men kemur helst víðari um, er kanska í starvi í norskum reiðaríi, siglir í Afrika, fer á skeið í Keypmannahavn, meðan hann vitjar dóttrina og abbabørnini við. Tað broytta er, at fyri hann kann „heima“ vera í fleiri støðum. Tað kann bæði vera tað staðið í Føroyum, har hann vaks upp, og har foreldrini búgva. Men tað kann eins væl vera eitt stað í Evropa ella Suðuramerika, har hann hevur konu og børn. Nútímans flutningsmøguleikar tryggja mobilitetin millum ymisku støðini, har hann „hevur heima“.

Týdningarmikið er her, at tað ikki longur bara er útisiglarin, sum er tann mobili. Vit síggja jú, at eisini handverkarar, t.e. størv vit vanliga hugsa sum staðbundin, flúgva aftur og fram, ikki minst í oljuvinnuni. Summir av hesum flyta, aðrir ikki. Vit skulu tí venja okkum við, at ein føroyingur er ein persónur, sum kennir seg heima fleiri staðni í senn, og eisini livir hareftir.

| | Frisør, andlits- og kropsrøkt | Heilsu- og almannaøkið | Hotell/ mat-stova / ferðavinna | Sakførari grannskoðan |
|---|---|---|---|---|
| Gentur | 36,2 % | 29,2 % | 21,9 % | 21,5 % |
| Dreingir | 0,2 % | 2,7 % | 5,4 % | 13,8 % |

*Tabell 1a: Tey yrkini sum gentur í framtíðini halda verða tey mest áhugaverdu.*

*Viðmerking: við bóklig leið meinast studentaskúli og handilsskúli. Við handverksleið meinast SIT og lærupláss.*

*Kelda: Studni.*

| | Fiskiskapur | Handverk og bygging | Ítróttur | KT-vinna |
|---|---|---|---|---|
| Dreingir | 25,6 % | 25,1 % | 20,9 % | 18,2 % |
| Gentur | 2,7 % | 2,9 % | 8,3 % | 2,1 % |

*Tabell 1b: Tey yrkini sum dreingir í framtíðini halda verða tey mest áhugaverdu.*

*Kelda: Olga Biskopstø og Bjarni Mortensen. 2004. Ung, útbúgving og fiskivinna.*

*Granskingardepilin fyri Økismenning. Arbeiðsrit Nr. 9/2004*

*Viðmerking: Tabellinar 1a og 1b byggja á spurnabløð svaraði av øllum føroyskum ungdómi á seinasta ári í fólkaskúlanum og seinasta ári á miðnámi. Tær vísa greitt, at gentur og dreingir hava rættuliga ymiskar hugsanir um, hvørjar vinnur tey vilja starvast í.*

| | 2004 | | 2008 | | 2011 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Kvinnur** | **Menn** | **Kvinnur** | **Menn** | **Kvinnur** | **Menn** |
| **Nr. 1** | Sjúkrasystir | HA | Pedagog | Lækni | Sjúkrasystir | Ingeniør |
| **Nr. 2** | Pedagog | Økonomi | Jura | Marknaðarføring | Lækni | Bygnings-konstruktør |
| **Nr. 3** | Lærari | Marknaðarføring | Lækni | Jura | Sosialráðgevi | Lækni |

*Tabell 2: Best dámdu útbúgvingarnar uttanlands millum føroyskar kvinnur og menn.*

*Kelda: Studni.*

*Viðmerking: Sjúkrasystir og lærari eru frammanundan útbúgvingar bjóðaðar verða út í Føroyum. Nógv fleiri kvinnur enn menn fara í dag at lesa til lækna.*

## Hvat fer at henda framyvir?

Framtíðin er altíð trupul at spáa um, tí bæði væntað og óvæntað kann henda. Verður olja funnin á føroyskum leiðum, so vil rákið við arbeiðsmegi kanska venda henda vegin. Púra greitt er tó, at mobila tilveran, herundir at stórt tal av fólki fær sínar inntøkur aðrastaðni enn her á landi, kemur at halda áfram. Trupulleikin fyri samfelagið er, at tað er bara eitt stað borgarin hevur pass, rindar skatt og kann atkvøða. Ein avbjóðing liggur tí í at fáa fólk at velja Føroyar fram um so nógvar aðrar áhugaverdar møguleikar, tá markið millum „at verða verandi" ella „at flyta" er rættuliga fínt.

Eitt grundleggjandi mynstur í hesum er, at gentur og dreingir gera sera ymisk val, eisini tá tey gerast vaksin. Hyggja vit eitt nú eftir vali av útbúgving, síggja vit, at kvinnurnar hava verið tær mobilu, tí serliga kvinnurnar raðfesta hægri útbúgvingar við fokus á umsorgan, har menn meira velja handverksvinnur og hugsa vinning. (*Sí tabell 1 a, 1 b á s. 36 og tabell 2 á s. 37*).

Tað er tí fokuserað verður á kvinnurnar, ikki minst í verandi kjaki um „fráflytingina". Spurningurin er tó, um tað framyvir ikki í líka stóran mun eru menninir, sum gerast mobilir, soleiðis sum dømini omanfyri kundu bent á!

Tá tosað verður um, hvat gerast kann, er nógv fokus natúrliga á vinnuliga partin. Men tað tykist, sum vinna verður sæð sum nakað atskilt frá restini av samfelagnum. Tað verður eitt nú tikið sum givið, at skattalættar føra við sær økta vinnu, men slíkur automatikkur finst ikki.

Tað er greitt, at vit eiga at vera varin við, hvat okkara skattakrónur verða brúktar til, men tað er líka so greitt, at svarið ikki liggur í einoygdum fokus uppá almennan niðurskurð og javnvág.

Hvat fer at henda framyvir, er ein spurningur um politikk og um at tora. Tað krevur eftir mínum tykki fokus uppá ein „mobilitetspolitik", t.v.s. eitt útgangsstøði í júst tí, at fólk eru grundleggjandi mobil.

Mobiliteturin eigur tí at vera ein grundleggjandi partur, tá vit gera skattaskipanir, avgjaldsskipanir og aðrar skipanir við, t.d. við at gera tað nógv lættari hjá hjúnafeløgum at gerast føroyingar. Ikki minst tey feløgini sum varða av áhugamálunum hjá teimum í vinnu aðrastaðni, eru her týdningarmiklar keldur til neyðuga vitan um nýggja veruleikan, vit liva í.

Vert er at taka við, at eisini í mobilitetssamfelagnum hava fólk tørv á tryggleika og nærveru, og hetta hava bæði kvinnur og menn til felags. Her er nakað, sum kann sameina tey ógvuliga ymisku valini, ið kynini bæði gera, tá tað ræður um útbúgving og starv. Tá tað kemur til tryggleika og nærleika, hevur føroyska samfelagið uttan iva ein kappingarfyrimun, sum vit tó enn ikki hava dugað at gagnnýtt. Tað er eisini til gangs fyri vinnuna, og tað kann saktans vera vinna.

Spurningurin er hinvegin, um okkara politiska skipan hevur innsæð, at lítið nyttar at síggja samfelagið sum ein „stongdan containara" alt skal síggjast út frá, tá veruleikin er, at heimurin í prinsippinum er víðopin fyri tey, sum hava eitt val.

# TÍN TRYGD
# - ER TÍN ÁBYRGD!

Eru landgonguviðurskiftini trygg ?

Nýtir tú persónliga trygdarútgerð ?

Er bjargingarútgerðin tøk og í lagi ?

Halda tit bjargingar- og brandvenjingar regluliga?

Yvirheldur tú kravdu hvílutíðina ?

## - eisini vit vilja,
## at tú ert trygg/-ur!

SJÓVINNUSTÝRIÐ

FAROESE MARITIME AUTHORITY

Sjóvinnustýrið . Inni á Støð 22 . Postrúm 28 . 370 Miðvágur . Tlf 35 56 00 . Fax 35 56 01 . Teldupostur fma@fma.fo . Heimasíða www.fma.fo




# Fá upp til

# 32% í avsláttri

**Betri pensjón tryggjar tær eina munagóða samansparing, sum leggur lunnar undir eina framhaldandi vælferð, tá ið tú fert frá fyri aldur.**

- Vit samanseta pensjón og tryggingar eftir tínum tørvi
- Vit umsita tína pensjón við størsta vinningi fyri eyga
- Umvegis Netpensjón hevur tú fult gjøgnumskygni

**Savnar tú tryggingar og pensjón hjá okkum, kanst tú fáa upp til 32% í avsláttri.**





**Hevur tú spurningar, ella kundi hugsað tær betri frágreiðing, set teg í samband við okkum á 345 700 ella betri@betri.fo**

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón

lív.fo

# Fá eitt ríkt lív

Lív hjálpir tær at fáa tað fíggjarliga í trygga legu





## Persónlig eftirløn

Lívið lagar seg ymiskt fyri okkum øll. Tí hava vit eisini tørv á ymiskum eftirlønum. Sum Føroya størsta og royndasta eftirlønarfelag, veitir Lív tær eina persónliga eftirløn. Vit hjálpa tær at laga tína eftirløn til tað lív, tú vilt liva og til ta framtíð, tú hevur útlit til.
Kom inn á **liv.fo** og fá innlit í, hvør eftirløn hóskar best til tín.

Innlit í útlit

ekko 239 239